# FRØÐI

2 / 2022 28. árg. kr. 48,-



*Les eisini*

SÁLARSJÚK SEND
**TIL DANMARKAR**
S. 10

**TVÆR KVINNULAGNUR**
Í 1800-TALINUM
S. 34

TALGILD MENNING
**– EIN AVBJÓÐING FYRI SKJALASØVN**
S. 30

*Frá fjargoymslu*
# TIL MYNDUGLEIKA

90 ár
TJÓÐSKJALASAVNIÐ

# Frøði hesaferð!

**Nógv fólk halda**, at skjalasavnsvirksemi snýr seg um at hyggja aftur í søguna. Hetta er sjálvandi partur av virkseminum, men ikki tað einasta. Tjóðskjalasavnið skal duga at leita í gomlum skráum og lesa gomul skjøl, men at fylgja samtíðini og at skoða út í framtíðina er nú vorðið høvuðsuppgávan.

Avgerðin um, hvat almennu Føroyar skulu varðveita fyri at tryggja framtíðar søguna, fyrisitingarligu góðskuna og rættartrygd borgaranna, liggur á herðum Tjóðskjalasavnsins. Henda uppgáva, at velja, hvat skal varðveitast, og hvat skal vrakast, hevur týdning, bæði fyri samtíð og framtíð. At fremja hetta í verki krevur serkunnleika, fjølbroyttar royndir og víðfevndar heimildir.

Greinirnar í hesi útgávu av Frøði vísa, hvussu fjølbroytt skjalasavnsarbeiði er. Nakrar greinir líta meira aftur í tíð, aðrar meira frameftir.

Greinin um *Skjalavarðveiting í 90 ár* lýsir gongdina, frá at skjalavarðveiting var ein tænasta, til hon gjørdist ein skylda. Greinin *Sálarsjúk send til Danmarkar* vísir á vandarnar við strangum vrakingarpolitikki, m.a. hvussu journalir hjá sálarsjúkum fyrst í 20. øld eru vrakaðir.

Úr einum søguligum sjónarvinkli lýsir greinin *Vita altíð hvør mamman er*, hvussu fløkjasligt tað viðhvørt kann vera at staðfesta foreldraskap. Síðani verður í greinini *Journalin, eitt týdningarmikið leitiamboð*, m.a. greitt frá týdninginum av at hava góð amboð at leita og finna í skjalasavni.

Greinin *Talgild menning* umrøður bæði fyrimunir og vansar við tí framferðarhátti, sum Tjóðskjalasavnið hevur valt at varðveita talgilt tilfar. Í greinini *Tvær kvinnulagnur í 1800-talinum*, verður greitt frá, hvussu tvær kvinnur verða revsaðar, onnur fyri at eiga barn uttan fyri hjúnalag, og hin fyri at taka lívið av nýfødda barni sínum.

Greinin *Goymd ella gloymd* snýr seg um, hvussu lógarverkini um dátuvernd og skjalasøvn heimila at varðveita persónupplýsingar. Í søguligu greinini *Nýggjar tíðir - nýggjar bøkur* verður við skrásetingum í 1700-talinum víst á, hvat slag av lesnaði fanst í Føroyum tá, og síðani verður hugleitt um átrúnaðarliga rákið, sum hesar 'nýggju bøkur' vóru partur av.

Í greinini *Hví skulu vit varðveita hagtals- og granskingardátur* verður ljós varpað á týdningin av at varðveita granskingartilfar og hagtøl í talgildum formi, so at tilfarið framyvir ikki missir sítt granskingarliga virði.

Í greinini *Felags eyðkenni* verður m.a. víst á, hvussu einstáttaðir arvaeginleikar saman við góðari skráseting av ætt og sjúku, gera, at Føroyar eru í eini serstøðu innan íleguggransking. At enda verður í *Eitt skattkamar um forfedrar okkara* greitt frá, hvussu tvey, sum brúka lesistovu Tjóðskjalasavnsins nógv, við rannsóknum í skjølum frá 1700-talinum hava skrivað søguna um Beintu.

FRØÐI 2 / 2022

NORÐURLENDSKT UMHVØRVISMERKI
Svanamerktur prentlutur 541 705

FØROYA FRÓÐSKAPARFELAG
GEVUR FRØÐI ÚT
© Føroya Fróðskaparfelag og høvundarnir.
Frøði er fólksligt vísindablað, sum kemur út tvær ferðir árliga.

Upplag 1.300
ISSN 1395-0045
Forsíðumynd: Páll J. Nolsøe og Annefía í Vági á Landsskjalasavninum eina ferð í 1970-unum
*Loyvt er at endurgeva úr Frøði, um víst verður til heimildina. Verða heilar greinir endurgivnar, má avtala gerast.*

AVGREIÐSLA
Jarðfeingi, J. Paturssonargøta 32-34
Postsmoga 3059
FO-110 Tórshavn
Tlf. 357000
teldupostur: frodi@jf.fo

RITSTUÐLAR
Fróðskaparsetur Føroya
Tjóðskjalasavnið
Tjóðsavnið
Landsbókasavnið
Havstovan
Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Jarðfeingi
Umhvørvisstovan

NÝGGIR HALDARAR
kunnu tekna seg hjá avgreiðsluni.

ELDRI ÚTGÁVUR AV FRØÐI
fáast við at venda sær til avgreiðsluna.

GREINIR TIL BLAÐIÐ
Fólksligar, vísindaligar greinir kunnu sendast ritstjórnini. Skrivlig høvundsleiðbeining fæst frá avgreiðsluni.

LÝSINGAR TIL FRØÐI
Er áhugi fyri at lýsa í blaðnum, setið tykkum tá í samband við avgreiðsluna, telefon 357000
fax 357001
teldupostur: frodi@jf.fo

LÝSINGARPRÍSUR
Heil síða:kr. 5.000,-
Hálv síða:kr. 3.000,-

RITUMBOÐSRÁÐIÐ
Erling Isholm, Fróðskaparsetur Føroya
Erla Olsen, Fróðskaparsetur Føroya
Sámal Tróndur Johansen, Tjóðskjalasavnið
Bjørg Mikkelsen, Heilsufrøðiliga Starvsstovan
Katrin Hoydal, Umhvørvisstovan
Lis Mortensen, Jarðfeingi
Eilif Gaard, Havstovan
Unn Patursson, Føroya Landsbókasavn

GRAFISK FRAMLEIÐSLA
OG PRENT: Føroyaprent

SAMSKIPARI
Helgi Jacobsen

RITSTJÓRN
Erling Isholm, *ábyrgd*
Birgitta Andreasen
Sissal Maria Rasmussen
Maria Nielsdóttir
Sissal Vágsheyg Erenbjerg

SAMSKIPAÐ FYRI
TJÓÐSKJALASAVNIÐ
Karin Jóhanna Leitisstein Knudsen
Sámal Tróndur F. Johansen

FRÓÐSKAPARFELAG FØROYA
Heimasíða: www.frodskaparfelag.fo
Limagjald: 300 krónur um árið, at gjalda á kontu í Eik Banka 9181-495.171.0
SWIFT code: EIKBFOTF,
Iban-no: F056 9181 0004 9517 10
*Minnist til at viðmerkja navn.*










# Innihald

4 SKJALAVARÐVEITING Í 90 ÁR – TAÐ SAMA, BARA ØÐRVÍSI
Sámal Tróndur Finnsson Johansen

10 SÁLARSJÚK SEND TIL DANMARKAR
Hanna Simona Christiansen

16 VITA ALTÍÐ HVØR MAMMAN ER
Annika Skaalum

24 JOURNALIN – EITT TÝDNINGARMIKIÐ AMBOÐ
John Kjær

30 TALGILD MENNING – EIN AVBJÓÐING FYRI SKJALASØVN
Poul Andrias Simonsen

34 TVÆR KVINNULAGNUR Í 1800-TALINUM
Karin Jóhanna Leitisstein Knudsen

38 GOYMD ELLA GLOYMD – VARÐVEITING AV PERSÓNUPPLÝSINGUM
Sámal Tróndur Finsson Johansen

44 NÝGGJAR TÍÐIR – NÝGGJAR BØKUR
Jákup Reinert Hansen

50 NEYÐUGT AT LANGTÍÐARVARÐVEITA HAGTALS- OG GRANSKINGARDÁTUR
Rói Eliasen

56 FELAGS EYÐKENNI FYRI EYGNASJÚKUR, MULTIPPEL SKLEROSU OG PARKINSON
Guðrið Andorsdóttir

62 EITT SKATTKAMAR UM OKKARA FORFEDRAR
Magni Laksafoss og Lydia Laksafoss

# SKJALAVARÐVEITING Í 90 ÁR – TAÐ SAMA, BARA ØÐRVÍSI

## – Hugleiðingar um tíðarbroytingar



**Sámal Tróndur Finnsson Johansen**
SamalTrondurJ@skjalasavn.fo
*Cand.scient.soc.*
*(søgufrøðingur og geografur)*
*Tjóðskjalavørður*

*Varðveiting í dag er nakað heilt annað enn fyri 90 árum síðani. Tá var uppgávan lítil og einføld, nú er hon stór og fløkt. Tá var hon ein tænasta, nú er hon ein skylda. Tá var hon uttan heimildir, nú er hon við heimildum. Broytingarnar eru stórar, og tí eru uppgávurnar eisini broyttar nógv.*

### Varðveiting uttan skipan

**Søgan um skjølini** og um varðveiting av skjølum er væl longri enn 90 ár. Elsta skjalið á goymslum Tjóðskjalasavnsins stavar frá seinnu helvt av 1200-talinum. Elsta røðin av skjølum í varðveitslu, eru tingbøkurnar 1615-1816.

Hóast eingin skjalasavnslóg tá fanst, sum álegði myndugleikum at langtíðarvarðveita skjøl síni, so valdi løgtingið at varðveita gomlu bøkur sínar.

Á sama hátt sum løgtingið (sorinskrivarin) varðveitti løgtingsbøkurnar, valdu aðrir myndugleikar eisini at langtíðarvarðveita skjøl síni. Tí hava vit enn skjøl frá seinastu 400 árunum við bæði fyrisitingarligum og rættarligum upplýsingum, við grundskráseting og nógvum øðrum.

Í 1859 endaðu skjølini hjá Fúta, Sorinskrivara og Kongliga Handlinum í eini felags skjalagoymslu hjá fútanum í Leigubúðini úti í Tinganesi. Síðst í 1800-talinum varð tó mett tryggast at flyta skjølini á danska Ríkisskjalasavnið í Keypmannahavn at varðveita.

### Varðveiting uttan heimildir

Fyrst í 1900-talinum hevði ein samanrenning av politiskum áhuga í Føroyum og politiskari vælvild í Danmark við sær, at gongd kom á málið um eitt føroyskt skjalasavn. Eisini fyrisitingin í Føroyum hevði áhuga fyri afturbering av skjølunum. Føroyski áhugin grundaði seg á eini hugsjón um, at tað var best, at skjølini vóru so tætt sum gjørligt at teimum, ið høvdu brúk fyri skjølunum. Skjølini skuldu skjalfesta tað undanfarna, styrkja bæði fyrisiting og dómsvald og vekja mentanarsøguliga medvitið í Føroyum.

Endin varð, at Færø Lands Arkiv varð sett á stovn í 1932 og fekk innivist í bygningi saman við Bókasavninum og Fornminnissavninum. Í bygninginum vóru skrivstovur, lesistova og goymslur. Trý av rúmunum vórðu sett av til skjalasavn við 350 hillametrum at seta skjøl á. Meginuppgávan var at fáa tilfarið skipað og eitt yvirlit. Skjótt gekk at fylla upp, og longu fá ár seinni var ov lítið pláss í bygninginum. Neyðugt var tí at leiga onnur hølí til goymslur. Færø Lands Arkiv hevði tá ongar heimildir, og tí heldur ongar uppgávur mótvegis avhendandi myndugleikum.

Í 1952 varð skjalasavnsvirksemið yvirtikið sum sermál og skipað sambært lóg sum sjálvstøðugur stovnur við navninum Føroya Landsskjalasavn. Sambært lógini skuldu landsins almennu skjøl varðveitast á Landsskjalasavninum. Lógin heimilaði tó ikki Landsskjalasavninum at áleggja myndugleikunum, hvørki at avhenda ella at hava skil á sínum skrásetingum. Landsskjalasavnið fekk eingi amboð at stýra avhendingartilgongdini við. Myndugleikarnir avgjørdu sjálvir, nær og hvussu avhendað bleiv. Møguliga er hetta ein orsøk til, at goymslur Landsskjalasavnsins í stóran mun fyltust við skjølum frá ríkisstovnum.

So hvørt sum framleiðslan í fyrisitingini vaks og avhendingar komu inn, gjørdist uppgávan hjá Landsskjalasavninum bæði størri og fløktari. Mitt í 1970-árunum fekk Landsskjalasavnið meira tíðarhóskandi høli til goymslu, skrivstovu og lesistovu. Skjótt vísti tað seg tó neyðugt at víðka bæði goymsluog skrivstovuhølið.

### Varðveiting við heimildum

Í 1990 varð ein donsk-føroysk avtala gjørd, ið álegði ríkisstovnum í Føroyum at avhenda skjøl síni til Landsskjalasavnið. Talan var um eina formalisering av galdandi mannagongdum. Sambært avtaluni skuldi Landsskjalasavnið halda ásetingar í danskari skjalasavnslóg fyri ríkisskjøl.

Lógin um Landsskjalasavnið, sett í gildi í 1992, álegði øllum myndugleikum skrásetingar- og avhendingarskyldu. Samstundis gjørdist Landsskjalasavnið ráðgevingar- og eftirlitsmyndugleiki ▸



*Mynd 1. Á sama hátt sum løgtingið (sorinskrivarin) varðveitti løgtingsbøkurnar, valdu aðrir myndugleikar eisini at langtíðarvarðveita skjøl síni.*

*Mynd: Tjóðsavnið*



*Í 1970-árunum var høvuðsuppgávan hjá einum skjalaverði at skipa og skráseta avhendað pappírstilfar og síðani at geva brúkarum atgeingi á lesistovu. Fyri at vegleiða brúkarar skuldi skjalavørðurin í minsta lagi kenna goymsluna, duga at gera skjalarannsóknir og kunna lesa gamla (gotiska) handskrift. Á myndini: Anneffa í Vági, skjalavørður og Páll Nolsøe, landsskjalavørður. Mynd: Tjóðskjalasavnið*

við heimild at góðkenna goymsluhøli. Av tí at avhendu skjølini nú eisini gjørdust yngri, ásetti lógin atgeingisfreistir, m.a. fyri at verja móti misnýtslu av persónupplýsingum.

Nú var tað formelt Landsskjalasavnið, sum setti krøvini, og myndugleikarnir, sum skuldu akta boð. Lógin legði sostatt upp til eitt meira proaktivt skjalasavn við størri ábyrgd og eyka uppgávum. Strangari lógarásetingar og vaksandi fyrisiting førdu við sær enn fleiri avhendingar og enn størri trýst á goymslur.

Fyrstu árini varð dentur lagdur á ráðgeving og hølisgóðkenning. Frá 2005 fór Landsskjalasavnið í gongd við meira skipað eftirlit, og tey næstu 10 árini vitjaði Landsskjalasavnið umleið 250 myndugleikar og stovnar. Landsskjalasavnið fekk harvið eitt sera gott innlit í støðuna hjá ymisku myndugleikunum. Samstundis fingu stovnarnir eisini nógv betri innlit í ásetingar í skjalasavnslógini og krøv, sum verða sett teimum í tí sambandi.

Kanning í 2015 vísti, at nógv meira pappírstilfar fanst hjá landsmyndugleikum, enn Landsskjalasavnið hevði goymslupláss til. Í eini roynd at stýra, hvat tilfar fekk rúm á avmarkaða plássinum, gjørdi Landsskjalasavnið ein raðfestingarlista við tí, sum var mest átroðkandi at fáa avhent. Enn hava ikki øll á listanum avhent síni skjøl, men arbeiðið er væl á veg. Eitt av skjalasøvnunum, sum er komið, er Landstýrið 1959-89. Í dag fylla pappírsskjølini á Tjóðskjalasavninum slakar 5 hillakilometrar.

## Varðveiting við 'talgildum' heimildum

Seinastu 15-20 árini hevur Landsskjalasavnið gjørt nógv fyri at varpa ljós á talgilda varðveiting. Í 2009 mælti Landsskjalasavnið politisku skipanini til at velja flytingar-háttin (migrering), sum føroyska strategi fyri varðveiting av talgildum tilfari. Hetta tók politiska skipanin undir við.

Í 2018 varð lógin um skjalasøvn broytt. Hetta varð gjørt fyri at víðka heimildirnar hjá Tjóðskjalasavninum. Tað snúði seg um at áleggja myndugleikum at avhenda talgilt tilfar, um at áseta nærri reglur um talgilda avhending og um at tryggja allar kt-skipanir í almenna geiranum.

Verulig gongd kom á talgilda varðveiting í tíðarskeiðnum 2016-20. Tá setti Tjóðskjalasavnið fleiri kt-skjalavørðar í starv og staðsetti kt-testverkstað og -goymslur. Samstundis vórðu kanningar gjørdar fyri at fáa innlit í, hvat fanst av kt-skipanum at varðveita. Um somu tíð setti Tjóðskjalasavn tiltøk í verk, sum høvdu til endamáls at breiða út vitan um talgilda varðveiting og at brynja myndugleikarnar til talgilda avhending.

Sum úrslit av hesi tilgongd hevur Tjóðskjalasavnið higartil fingið nærum 30 talgildar avhendingar, sokallaðar skjalasavnsútgávur. Væntandi fer bæði talið á avhendingum og serliga mongdin av dátum á goymslum Tjóðskjalasavnsins at vaksa skjótt komandi árini.

## Skjalavarðveiting – tað sama ella øðrvísi

Tjóðskjalasavnið hevur nú virkað í 90 ár. Langtíðarvarðveiting av skjølum í Føroyum hevur tó nógv fleiri ár á baki. Hóast orðið 'varðveiting' í sær sjálvum merkir tað sama sum áður, so er virksemið, sum er knýtt at hesum orði, nógv broytt. So hvørt sum samfelagið umskapast, broytist innihaldið av fyribrigdinum varðveiting. Onkuntíð meira og aðra tíð minni. Hetta sæst við at eygleiða, hvussu skjalavarðveiting er broytt. ▸

## Tíðarlinja

**2019**
Avtalað gjørd millum Tjóðskjalasavnið og Arnamagnæanska Savnið í Keypmannahavn, um deponering av handritum og skjølum, m.a. 'Húsavíkabrøvini'.

**2018**
Nýggj løgtingslóg um skjalasøvn, sum inniheldur ásetingar um avhending og varðveiting av talgildum tilfari. - Stovnurin skiftir navn til Tjóðskjalasavnið og fær samstundis egið búmerkið.

**2016-20**
Farið verður undir talgilda varðveiting. Hetta merkir m.a. talgildar avhendingar, kt-testverkstað og kt-goymslur til endamálið.

**2014**
Føroyar (mentamálaráðharrin) skriva undir alheims yvirlýsing í Reykjavík, sum sigur, at skjalasøvn hava ein serligan leiklut í nútímans samfelagnum.

**2011-17**
Stovnurin gerst partur av 'Søvnum Landsins', ein yvirskipað fyrisiting fyri bókasavn, skjalasavn og gripasøvn, men hetta samstarv eydnast ikki og verður tí niðurlagt.

**2010**
Heimasíðan www.history.fo verður upprættað, við nærum 50.000 skanningum, av mest brúktu skjølunum. Hervið økjast vitjanartølini ógvusliga.

**2009**
Landsskjalasavnið viðmælir serliga 'flytingar-háttin' (migrering), sum varðveitingar-strategi fyri Føroyar.

**2007**
Landsskjalasavnið ger rammuavtalu við danska Ríkisskjalasavnið, um afturbering úr Danmark, av føroyskum skjølum. Samstundis koma fleiri skjøl til Føroya, m.a. 'Indberetninger fra en Reise i Færøe 1781 og 1782' av Jens Christian Svabo

**2006-**
Avtalað gjørd við Ílegusavnið, um gerð av Ættarbandsskránni, sum síðani hevur verið ment og viðlíkahildin.

**2005**
Landsskjalasavnið fer í holt við skipað eftirlit av stovnum.

**1992**
Løgtingslóg um Landsskjalasavnið, sum m.a. heimilar stovninum at áleggja øllum stovnum í Føroyum at avhenda skjøl v.m. - Gjørdar verða ásetingar um atgeingi til skjøl, og byrjað verður við meira skipaðari vegleiðing og ráðgeving.

**1990**
Donsk-føroysk 'arkiv-avtala', sum áleggur ríkisstovnum at avhenda til Landsskjalasavnið. - Sama árið verður 'Kongsbókin', við 'Seyðabrævinum' afturborin úr Svøríki.

**1974-84**
Goymsla og fyrisitingin hjá Landsskjalasavninum flyta á Debesartrøð. Hetta merkir m.a. serlig goymsla, bygd til langtíðarvarðveiting av pappírsskjølum.

**1952**
Færø Amts Arkiv verður til Føroya Landsskjalasavn og verður samstundis ein føroyskur stovnur.

**1932**
Færø Amts Arkiv verður sett á stovn, sum ein ríkisstovnur, og skjøl koma aftur til Føroya.

**1904-32**
Mál um afturbering av føroysku skjølunum og stovnan av føroyskum skjalasavni, verður tikið upp millum Føroyar og Danmark.

**1899**
Skjølini frá Leigubúðini verða flutt á Ríkisskjalasavnið í Danmark.

**1859**
Nøkur skjalasøvn verða miðsavnað í gomlu Leigubúðini, tá fútin fær húsini sum skrivstovuhøli.

**16. øld-1858**
Myndugleikar varðveita í hvør í sínum lagi tey skjøl, ið hoyra til teirra skjalasavn.



*Mynd 3.* Góð talgild fyrisiting gevur gott talgilt skjalasavn. Fyri at tryggja góðsku í teimum skjalasavnsútgávum, sum myndugleikar skulu avhenda, skipar Tjóðskjalasavnið við millumbili fyri góðskutryggingarskeiðum fyri journalførarar og kt-fólk. Her síggjast umboð fyri m.a. Landsverk, TAKS og Umhvørvisstovuna á skeiði hin 4. oktober

Tá myndugleikar fyri fleiri hundrað árum síðan sjálvir varðveittu skjøl, var uppgávan einføld. Talan var um teirra egnu skjøl til egið brúk. Uppgávan hjá Færø Lands Arkiv var eitt sindur størri og fløktari. Nú varð neyðugt at skipa og skráseta tilfarið, soleiðis at onnur kundu granskað í skjølunum. Tá Landsskjalasavnið varð sett á stovn, og føroyska fyrisitingin fór at vaksa, gjørdist uppgávan enn størri og fløktari, bæði við goymslum, skráseting og vegleiðing. Tá lógin um Føroya Landsskjalasavn kom seinni, fingu almennir myndugleikar álagt skyldu at avhenda skjøl, at vera undir eftirliti og at fáa skjalagoymslur sínar góðkendar. Við talgildari varðveiting eru heimildirnar at góðkenna kt-skipanir og at áseta tíðarfreistir víðkaðar. Samstundis eru krøv til førleikar og infrakervið á Tjóðskjalasavninum grundleggjandi broytt.



# Sálarsjúk SEND TIL DANMARKAR

## Danskur kassatións-politikkur ávirkan á føroyska søgu

*Í 1903 fór ein ung lærarinna, ið var sálarsjúk, til viðgerðar á sinnisjúkrahúsinum Oringe í Vordingborg í Danmark. Kvinnan doyði í 1957 á einum røktarheimi fyri sálarsjúk í Danmark. Hon kom ongantíð aftur til Føroya. Sjúklingajournalin hjá kvinnuni er burturbeind orsakað av donsku skjalasavnslógini og hartil galdandi kassatiónsreglum.*



**Mynd 2.** *Loftmynd av Oringe uml. 1960. Thunes Forlag, Vordingborg (arkiv.dk)*



**Hanna Simona Christiansen**
hanna@skjalasavn.fo
*B.A. í søgu*
*Kt-skjalavørður*
*Tjóðskjalasavnið*

**Frá 1866 fram** til umleið 1940 vórðu umleið 205 føroyskir sálarsjúklingar sendir til Danmarkar til viðgerðar á donskum sinnissjúkrahúsum; í flestu førum á Oringe í Vordingborg.

Fyri føroyska gransking innan psykiatriska, eins væl og aðra gransking, viðføra donsku kassatiónsreglurnar eitt stórt tap av viðkomandi og týdningarmiklum upplýsingum.

Ein psykiatrisk sjúklingajournal sigur sum søgulig kelda ikki einans nakað um sjálvan sjúklingin og hansara/hennara sjúku, men eisini nakað um hugburðir, ið vóru galdandi í samfelagnum og samtíðini hjá teimum, ið vóru sálarsjúk. Hugburðir hjá bæði læknum, vanligum fólkum og samfelagnum sum heild.

## Hvørjir sjúklingar vórðu sendir til Danmarkar

Av 205 sjúklingum er talan um 104 menn og 101 kvinnur, ið verða send til Danmarkar.

Diagnosurnar, sum síggjast aftur hjá teimum føroysku sjúklingunum, eru tær, vit kallað fyri „tungar/álvarsamar diagnosur“ innan psykiatri. Talan er í flestu førum um sjúklingar við psykotiskum sjúkum.

Tann unga lærarinnan fekk diagnosuna *Dementia præcox*, í dag kallað skizofreni.

Vit kunnu kanska ímynda okkum, at hesir sjúklingar óivað hava verið til ampa/órógv fyri tey avvarðandi og onnur, og at teir tí eru sendir til Danmarkar. Tað vita vit ikki við vissu.

Um hugsað verður um aðrar „lættari“ diagnosur sum tunglyndi, angist o.s.fr, so hava fólk við slíkum útgreiningum ivaleyst onga læknaliga hjálp fingið. Talið av sálarsjúkum føroyingum, ið vóru sendir til Danmarkar, hevur tí ivaleyst verið munandi hægri enn hesi 205.

## Menning og broytingar innan psykiatriska viðgerð í søguligum høpi

Gjøgnum tíðina hava stórar broytingar og nógv menning verið innan psykiatriska viðgerð. Viðgerðir, sum vóru frá umleið 1920-unum og fram til 1950-ini, halda vit hava verið ræðuligar við nútíðar eygum. Insulinsjokk og lobotomi eru kanska tær kendastu av teimum eldru viðgerðunum. Hesar verða als ikki nýttar í dag. Elektrosjokk, sum fyrr var brúkt uttan

| Diagnosa | Tal |
|---|---|
| Skizofreni (Dementia præcox, Ungdomssløvsind/Sløvsind) | 66 |
| Bipolar (Manio-Depressiv, við og uttan psykosu) | 78 |
| Psykosa | 12 |
| Depression | 12 |
| Annað (Vanvid, Hysteria, Paranoia o.a.) | 14 |
| Onga diagnosu (Einki skrásett) | 23 |
| **Tilsamans** | **205** |

## ORINGE

Í 1856 varð eitt nýtt sinnissjúkrahús bygt í Vordingborg. Staðsetingin var á hálvoynni Oringe, og tí verður sinnissjúkrahúsið sum oftast kallað Oringe. Í 1889 varð avtala gjørd millum Føroya Amt og Justitsministeriet í Danmark. Sambært avtaluni kundu sinnissjúk í Føroyum sendast á Oringe til viðgerðar. Fyrsti føroyski sjúklingur á Oringe varð innlagdur í 1866. Frá 1889 og fram til umleið 1940 vórðu flestu føroyskir psykiatriskir sjúklingar sendir á Oringe. Frá umleið 1945 og fram til 1969 vórðu føroyingar sendir til sinnissjúkrahúsið í Nykøbing Sjælland.


Skema B.

Lægeoplysninger
til brug ved ansøgning om optagelse af en patient paa
Sindssygehospitalet ved Vordingborg.

Patientens fulde navn (for gifte kvinder tillige fødenavn):

Fødselsaar og -dag: Fødested:

Hjemsted (d. v. s. faste bopæl):

Patientens forældre:

Er eller har patienten været gift og i saa fald med hvem og hvorlænge?

Børnenes antal:

Hvor mange af disse er døde og i hvilken alder?

Borgerlig stilling:

Trosbekendelse:

Familiedisposition:
Har nogen af patientens paarørende i opstigende linie eller sidelinie været sindssyg?

eller gjort sig bemærket ved særlige karaktereiendommeligheder?

Juli 1927.

## Hvat er kassatión?

*Kassatión merkir at burturbeina/vraka skjøl, har mett verður (av skjalasavninum) at hesi ikki skulu varðveitast. Sum heild snýr tað seg aloftast um skjøl, ið innihalda prentað tilfar, avrit av upprunaskjølum, ella har somu upplýsingar møguliga kunnu finnast í øðrum skjølum/søvnum. Innan skjalasavnsøkið er kassatión neyðsynlig. Tað ber ikki til at varðveita øll skjøl, ið eru og verða skapt. Sum heild er orsøkin plásstrot og pengar. Sostatt kann tað eisini gerast neyðugt at fara inn í einstøk søvn og velja skjøl út, ið skulu kasserast. Trupulleikin er so, hvat skal varðveitast, og hvat skal ikki, og hvussu hetta skal gerast.*

doyving, verður framvegis brúkt, men nú við doyving. Tað stóra frambrotið var, tá ið heilivágur kom í byrjanini av 1950-unum.

### Týdningarmikla vitanin í psykiatriskum sjúklingajournalum

Vit kunnu ímynda okkum, hvussu nógv sjúklingajournalin hjá tí ungu lærarinnuni hevði kunnað sagt okkum um hana, um journalin var til. Vit høvdu fingið nógv at vita um hennara lagnu, lív og sjúku. Ein psykiatrisk sjúklingajournal kann t.d. innihalda persónlig brævasambond og aðrar persónligar lýsingar og viðurskifti. Eitt nú hvussu tað ávirkar tann sjúka at verða sendur til eitt annað land, tí viðkomandi er ov sjúk/ur at vera í egnum landi. Hvussu hevur tað ávirkað tey avvarðandi at missa sambandið og møguliga ikki síggja síni kæru aftur í fleiri ár - ella ongantíð. Hvørjar viðgerðir hevur sjúklingurin fingið og hví? Hevur mátin vit seta diagnosur uppá, broytt seg? Hvussu ella hvør er broytingin?

**Keldur**
Christiansen, Hanna Simona, 2021. Bachelorritgerð í søgu. *Varðveiting og kassatión av føroyskum psykiatriskum sjúklingajournalum í Danmark. Ein kanning av hvussu danskur kassatiónspolitikkur kann ávirka søguliga gransking í Føroyum.* Fróðskaparsetur Føroya.
Kragh, J. V., 2010. *Det hvide snit, Psykokirurgi og dansk psykiatri 1922-1983.* 1. udg. ed. Odense: Syddansk Universitetsforlag.

## Danskar kassatiónsreglur

*Kassatiónsreglur í donsku skjalasavnslógini áseta, at tað einans er neyðugt at varðveita tær sjúklingajournalir, ið eru upprættaðar, ella halda áfram aftaná 1950, og har føðidato er tann fyrsti í hvørjum mánaði. Hetta merkir, at allar føroyskar psykiatriskar sjúklingajournalir, ið byrja, ella framvegis eru virknir aftaná 1950, og har føðidato ikki er tann fyrsti í einum mánaði, allarhelst eru burturbeindar orsakað av donskum kassatiónspolitikki.*

*Hetta førdi til, at føroyskir psykiatriskir sjúklingar hoyrdu undir danskari fyrisiting og vóru mettir at vera danskir sjúklingar. Øll skjalfesting av teimum føroysku sjúklingum er tí skrásett í Danmark. Hetta viðførir sostatt, at tá tey donsku sinnissjúkrahúsini hava avhendað teirra skjøl til Ríkisskjalasavnið í Danmark, koma hesi skjøl undir danska skjalasavnslóg og hartil galdandi kassatiónsreglur.*





### Avleiðingar av donskum kassatiónsreglum

Um vit sum avvarðandi ynskja at fáa innlit í sjúklingajournalina hjá einum ávísum persóni, ið var innlagdur á einum donskum sinnissjúkrahúsi, hava donsku kassatiónsreglurnar í fleiri førum viðført, at ongar upplýsingar eru til longur um persónin. Øll skjalfesting, ið kundi lýst lívssøguna hjá einstakum persónum nærri, er burtur. Hetta í sær sjálvum er syrgiligt og óvirðiligt fyri teir sjúklingar, har hetta er hent.

Vóru tað onnur, sum vóru sjúk í familjuni ella høvdu verið psykisk sjúk? Hetta skuldi viðmerkjast í oyðublaðnum fyri sjúklingar, ið vórðu innlagdir á Oringe. Fyri psykiatriska ílegugransking í Føroyum høvdu hesar sjúklingajournalir gjørt tað møguligt at farið longur aftur í tíðina, enn møguligt er í dag. Føroyska psykiatriin byrjar sum so ikki fyrrenn 1969, men føroyskar psykiatriskar sjúklingajournalir í Danmark ganga í øllum førum aftur til 1866. Tískil eru hesar sjúklingajournalir ein týdningarmikil partur av føroyskari søgu, gransking og føroyskum samleika. Tíverri eru avleiðingarnar av donskum kassatiónspolitikki í fleiri førum, at ein rúgva av ómissandi upplýsingum eru farnar fyri skeyti, sum á ongan hátt kunnu endurskapast, ella har nakað kann setast í staðin.

## Lobotomi

*Lobotomi, eisini kallað „hvíta snittið," er allarhelst tann mest umstrídda viðgerðin innan psykiatri. Viðgerðin var ein skurðviðgerð, har nervarásirnar í fremsta partinum í heilanum vórðu skornar av.*

*Viðgerðin varð brúkt til tær mest truplu og álvarsomu sinnissjúkurnar, ið vóru Dementia præcox (Skizofreni) og Manio-Depressiv psykosa (Bipolar). Sjúklingar við hesum diagnosum kundu vera innlagdir í fleiri ár á sinnissjúkrahúsum, í summum førum restina av lívinum.*

*Tilsamans fingu 10 føroyskir sjúklingar hesa viðgerð. Einans tveir av teimum vóru útskrivaðir, hinir doyðu á Oringe eftir eina miðal innleggingargongd, ið var 34,3 ár.*

*Mater semper certa est*

# VITA ALTÍÐ HVØR MAMMAN ER

*Foreldraleikluturin er ein fjølbroyttur leiklutur, og hevur søguliga støðugt verið knýttur at hjúnalagnum, meðan børn fødd uttanfyri hjúnalag, hava verið at meta sum ein sosial og fíggjarlig vanlukka í eldri tíðum. Greinin lýsir tær broytingar, sum eru farnar fram í sambandi við foreldraleiklutin tey seinastu 500 árini.*



**Annika Skaalum**
annikask@skjalasavn.fo
cand.mag
Skjalavørður



*Málningurin hjá Frants Henningsen (1850-1908) kann metast sum ein listarlig ímynd av stakum uppihaldarum og teirra børnum frá 1700 og frameftir, tá atlitið til umsorgan fyri hesum alt meira kom í fokus.*

**Tvær vikur eftir** at lógaruppskotið um sammøður var samtykt, segði løgtingsformaðurin, Jógvan á Lakjuni, m.a. soleiðis:

> *„Skulu vit lóggeva, so haldi eg at vit áttu at lýst alt, sum hevur við hetta at gera, nógv betur. Eg kann als ikki góðtaka, at ein pápi kann lóggevast heilt út úr skipanini, um vit nú tosa um sammóður.“*

Í føroysku ættarbandsskránni síggjast nógv dømi um foreldur, ið eru so at siga „lóggivin heilt úr skipanini“ – ókend foreldur og ivasom foreldur – tí viðurskifti í gomlum døgum vóru soleiðis háttað, at tað var – og er – trupult at staðfesta ílegulig foreldur. Soleiðis er ikki longur, og í dag ber til at staðfesta hesi foreldur við afturvirkandi kraft gjøgnum DNA kanningar.

**Í dag ber til at kanna** faðirskap longu áðrenn føðing: https://jordemoder.dk/faderskabstest/ Síðan 2002 hevur, hjá 18 ára gomlum og eldri, verið gjørligt at kanna t.d. ivasaman faðirskap við DNA roynd. Hesar kanningar og royndir kunnu síðan nýtast í ymiskum øðrum rættarmálum.

**Ættarbandsskráin** er gjørd í samstarvi millum Tjóðskjalasavnið og Ílegusavnið: https://biobank.fo/

**Viðkomandi leinki** í smb.v hjúnalag, foreldramyndugleika og barsil:

- https://logir.fo/Anordning/228-fra-15-03-2007-om-ikrafttraeden-for-Faeroerne-af-lov-om-foraeldremyndighed-og-samvaer
- https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9753
- https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9751

Ættarbandsskráin leggur dent á ílegulig foreldur, skrásett í kirkjubókum, ið sum oftast eisini eru løgfrøðilig foreldur – hóast hesi ikki altíð fella saman í veruleikanum. Gingið verður út frá, at hjún, sum fáa børn, eisini eru íleguligu foreldrini, um ikki annað er fráboðað, ella í øðrum førum ikki er gjørligt, eitt nú í samkyndum hjúnaløgum. Hjún hava eisini sjálvvirkandi felags foreldramyndugleika – undantikið menn í samkyndum hjúnalagi í Føroyum.

Fyri at venda aftur til ókendu foreldrini eru á føroyska ættartrænum hópur av greinum, sum enda meira og minni blint í 18. øld og aftureftir, tí miðvís og nágreinilig skráseting av føddum børnum byrjar ikki av álvara fyrr enn í 18. og 19. øld.

Frá miðskeiðis í 19. øld og frameftir hava vit aftur hóp av greinum, ið enda í blindum, men av øðrum orsøkum enn áðurnevndu. Hetta venda vit aftur til.

Áðrenn 1800 – og uttanum kirkjubøkur – ber til at finna ókendar forfedrar/pápar í tingbókum, jarðarbókum, skiftiprotokollum, koppsetingartabellum, fólkateljingini 1801, faðirskapsmálum o.ø. skjølum ▸

**Keldur**
Dimmalætting, 04. 02. 2022
Thomsen, Asbjørn Romvig: Uægte børn – en udstødt befolkningsgruppe? Om uægte børn i Salling fra 1750 til 1830, *SIDEN SAXO NR. 2, 2012*
Adolphsen, Caroline: Retsforholdet mellem forældre og børn, kap.1, _book_9788771982657_book-part-9788771982657-sec06-preview.pdf
Mikkelsen, Johan G., Eysturoyar Kirkjubók, Felagið Varðin, 2020.
Ættarbandsskráin, Tjóðskjalasavnið

**Leinki**
https://biobank.fo/https://jordemoder.dk/faderskabstest/
https://logir.fo/Anordning/228-fra-15-03-2007-om-ikrafttraeden-for-Faeroerne-af-lov-om-foraeldremyndighed-og-samvaer
http://history.fo/les-meir-um-kirkjuboekur
https://www.kb.dk/inspiration/kvinders-kamp-medborgerskab/kvindepolitiske-milepaele
https://logir.fo/Logtingslog/41-fra-26-03-2002-um-folkanovn-sum-broytt-vid-logtingslog-nr-33-fra-30-april
https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9751
https://www.logting.fo/mal/mal/?id=9753
https://kvf.fo/greinar/2017/03/05/login-ma-dagforast
https://dagur.fo/papar-fylkjast-i-felag
https://lesarin.fo/raett+til+mammu+og+babba.html?fbclid=IwAR3qkFSRABx6h1lqJtaB-Jf4VgSwocb06XOH6Jn_yNtXllhUDlbqr-5lSwl
https://danmarkshistorien.dk/vis/materiale/frederik-2s-ordinans-om-aegteskabssager-19-juni-1582
https://danmarkshistorien.dk/vis/materiale/seksuallovgivning-foer-1849/

**Elstu ásetingarnar fyri Føroyar** um at prestar skuldu føra kirkjubók, eru § 2-8-7 í Norsku lóg hjá Christian V frá 1687. Elsta kirkjubókin í Føroyum er fyri Eysturoyar prestagjald, og hon er eisini frá 1687. Um hetta er av tilvild ella ikki, vita vit ikki, men í øllum førum komu kirkjubøkur fyri hini prestagjøldini nógv seinni – Sandoy 1719, Suðuroy 1745, Suðurstreymoy 1757, Norðoyggjar 1760, Vágoy 1797 og Norðstreymoy 1816: http://history.fo/les-meir-um-kirkjuboekur

hjá almennum myndugleikum, men ofta í avmarkaðan mun, m.a. tí hesi í høvuðsheitum snúgva seg um menn. Einans teir vóru myndugir persónar, ið kundu hugsast at hava virksemi, ið hevði við myndugleikar at gera. Eitt annað, sum er til fyrimuns at finna pápar í eldri tíðarskeiðum, eru eftirnøvn hjá børnum. Tá er talan um „patronym“.

Seinastu stórt hundrað árini hevur patronymsiðvenjan tó aftur vundið uppá seg, og er í nýggjari tíð útbygd við matronymum. https://logir.fo/Logtingslog/41-fra-26-03-2002-um-folkanovn-sum-broytt-vid-logtingslog-nr-33-fra-30-april

Ógiftar 25 ára gamlar kvinnur gjørdust myndugar í 1857. Giftar kvinnur í 1899.

Í tingbókunum síggja vit ymisk heiti fyri kynsliga samveru uttan fyri hjúnalag – við og uttan børn: „Hor“, „Frillelevned“, „Lejermål“, „Slegfred“.

Giftar konur verða í hesum tíðarskeiði sjáldan ella ongantíð nevndar við navni, men sum „hustru“ hjá hesum ella hasum manninum – undantikið onkrar konur hjá embætismonnum, ið høvdu hægri tign enn aðrar giftar konur. Við øðrum orðum: Um ein mamma er ókend, er altíð talan um gifta konu.

Ógiftar kvinnur, ið fáa børn og sum verða ákærdar fyri kynsliga samveru og onnur lógarbrot, verða altíð nevndar við navni í teimum førunum, og í ættarbandshøpi uppliva vit tí tað marghháttliga stundum at síggja, hvørjari kvinnu ein maður hevur verið t.d. ótrúgvur ella leysagiftur við. Tvørturímóti síggja vit ikki, hvørjari konu hann var giftur við og sum er mamma at børnum hansara, hóast vit longu í Rómararættinum finna grundregluna: „*Mater semper certa est*“.[1]

1 Lat. *„mamman er altíð viss“*

**Í ættarbandsskránni** er hópur av nøvnum v/ árstali & staðarnavni, men ongum øðrum. Ofta sæst ein pápi v/ barni nevndur í 16. og 17. øld v/ ókendari mammu, men sum annars ongi onnur slektstilknýti hava. Hesi eru í roynd og veru fyri okkum eins „ókend“ og tann navnleysa mamman. Munurin er bert, at tað møguliga í framtíðini fer at bera til at eyðmerkja tey nærri. Við einstøkum undantøkum eru øll hesi ikki tikin við uppgerðina her.

## Avbjóðingar at finna foreldur/mammur fyri 19. øld.

Sum sagt ber til at fara í skjøl hjá ymiskum myndugleikum at finna persónar, áðrenn kirkjubøkurnar gerast tøkar, og tað eydnast eisini í mongum førum. Men her eru avbjóðingar, ið avmarka hesar møguleikar, og ein tann vanligasta er, at tey somu nøvnini ganga aftur, bæði for- og eftirnøvn (vegna patronymini). Um vit taka elstu kirkjubókina frá 1687 sum dømi, so verður í fyrsta lagið hildið fram við siðvenjuni, ikki at nevna giftu mammurnar við navni, heilt fram til 1735. Í øðrum lagi eru tað sum sagt somu nøvnini, ið ganga aftur. Í talvuni til høgru síggja vit dømi um, hvørji fornøvn børn fáa í tíðarskeiðinum 1687-1735 í Eysturoy. Talan er um í alt 1031 børn: 463 gentur og 512 dreingir, (38 børn hava hvørki navn ella kyn uppgivið). Hjá umleið 2/3 av hesum børnum ganga somu 6 dreingja/gentunøvnini aftur, og orsøk er at halda, at hesi nøvn eisini hava gingið aftur í ættarliðum frammanundan hesum:

Tá so er, er sera ringt at taka dagar ímillum, tí sannlíkindini fyri samansetingini av somu for- og eftirnøvnum gerst so stór. Hetta fyribrigdið ger seg galdandi gjøgnum mong føroysk ættarlið, sambært teimum nøvnum vit hóast alt hava skjalprógv fyri.

Nágreiniliga førdar kirkjubøkur eru hinvegin eitt sera gott amboð at minka um vandan fyri misskiljingum. Við føðidato – bæði hjá børnum (1816) og foreldrum (1921) – kemur ikki fyri, at bland kemur í. (Føðidato áðrenn hetta er ofta grundað á metingar í rundum árstølum).

- Millum 1687 og 1735 fingu einans 17 børn mammuna nevnda við navni í Eysturoyar Kirkjubók. Hesi vóru øll leysingabørn, og fyrsta „ektabarn“ skrásett við navni á báðum foreldrum var:
  - *1735- d: 6 Junij döbt et Pigebarn i Næs Kirke kaldit* Kristen. *Dets Forældre. Simon Olufsen og Suneva Jacobsd: af Schaale.* (GG at bert dópsdagurin er skásettur) ▸




*Úrslit av triðju viðgerð í løgtinginum um sammóðir (Mynd: Sverri Egholm)*

**Dreingjanøvn Eysturoy 1687-1735**




**Gentunøvn Eysturoy 1687-1735**




*Seks dreingja- og gentufornøvn í Eysturoyar Kirkjubók 1687-1735 (Nøvn sum t.d. Ole/Oluf & Anne /Ane verða ofta brúkt hvørt um annað í hesari tíðini)*

http://tilfar.lms.fo/logir/logasovn/Bang.pdf
https://danmarkshistorien.dk/vis/materiale/fattiglovgivningen-i-danmark-1660-1849-fra-tiggertegn-til-grundlovssikret-ret
Lov nr. 130 27.maj 1908 http://www.salldata.dk/love/love/1908-05-27.pdf
https://www.sa.dk/da/hjaelp-og-vejledning/rigsarkivets-online-vejledninger/faderskabssager-kom-godt-gang/
https://www.dst.dk/da/Statistik/nyheder-analyser-publ/bagtal/2012/2012-03-05-milepaele-kvinder
https://denstoredanske.lex.dk/u%C3%A6gte_b%C3%B8rn
Lov nr. 131 af 7. Maj 1937 om Børn uden for Ægteskab
Lov nr. 200 af 18.05.1960 om børns retsstilling
https://famf.fo/fadir-and-sammodurskapur
https://landslaeknin.stps.dk/fo/utgavur/heilsulysing-landslaeknans-fyri-2020/~/media/D59C4FAB02C-B4180AD8A55520C08D669

## Ókendar mammur og pápar

Nógvar ættargreinar fara sundur í helvt, tá bara annað foreldrið er kent – ofta í fleiri ættarlið – og í ættarbandsskránni eru nú meira enn 600 ókendar mammur og pápar. (Hesi tøl broytast so hvørt ættarbandsskráin mennist).

Hóast eingin munur er á nøgdini av ókendum mammum og pápum, eru aðrir munir rættiliga stórir, sum sæst á talvunum niðanfyri (Børn fødd áðrenn ár 1500 eru ikki við í hesum talvum):

*Myndin niðanfyri: 633 ókendar mammur eiga 1340 børn & 631 ókendir pápar eiga 630 børn millum 1500 og 2022.*

Her er m.a. vert at geva gætur:

- Talið á børnum: Ókendu mammurnar eiga í meðal 2,1 børn og ókendu páparnir 1 barn í meðal.
- Nær hesi eru fødd: Ongi børn hava ókenda mammu eftir 1806, og so at siga ongi børn hava ókendan pápa áðrenn miðskeiðis í 19. øld. (Vit vita um tríggjar).
- Í summum førum er helst talan um meira enn eina ókenda konu/mammu í størri barnaflokkum. Hesar gitingar eru tó ikki skrásettar.
- At ógiftir pápar, sum gjøgnum rættarmál verða dømdir til pápa, ofta ikki standa í kirkjubókunum. Hesir dómar kunnu verða feldir á ivasomum grundarlag. Og til 1919 kundu pápar svørja seg til frítøku.
- at ókendu mammurnar vóru giftar konur, meðan ókendu páparnir ikki vóru/eru giftir við mammunum.

## Børn í og uttan fyri hjúnalag.

Frá samfelagsins síðu hevur gjøgnum øldir nógv áherðsla verið løgd á at tryggja børnum uppvøkstur innan karmarnar í einum hjúnalagi. Umframt formligar lóggávur og ógvusliga revsing, var eisini sosialt eftirlit í gerandisdegnum við bæði vaksnum og børnum. Talan hevur verið um happing, útspilling og útihýsing fyri at ræða fólk frá at fáa sær børn uttanfyri hjúnalag. Hetta er tíbetur minkað burtur í lítið og einki, eins og meira enn helmingurin av øllum nú eru fødd uttanfyri hjúnalag.

Men samstundis uppliva vit eitt vaksandi kjak og politiskt stríð um hjúnabandslóggávu og foreldramyndugleika, bæði her og úti í heimi, og dagsins spurningar um foreldur og børn, í og uttan fyri hjúnalag, hava sín uppruna langt aftur í tíðini, og tíðarlinjuni niðanfyri síggja vit nøkur dømi um viðurskifti, ið hava havt ávirkan á søguligu gongdina: (Mynd 10 her: Tíðarlinja)

Her sæst m.a.

- At samstundis sum byrjað verður av álvara at føra kirkjubøkur, minkar talið á ókendum mammum.
- At revsingar fyri kynsliga samveru og børn uttanfyri hjúnalag eru avtiknar tá talið á ókendum pápum byrjar at vinda uppá seg í Føroyum.
- At sokallaða „Trælalógin“ frá 1777 somuleiðis var avtikin.
- At Grundlógin við síni fátækrahjálp kom í gildi.
- At ógiftar, 25 ára gamlar kvinnur gjørdust myndugar í 1857.
- At til 1922 vóru ógiftar mammur tær einastu mammurnar, ið høvdu foreldramyndugleika yvir børnum sínum.
- At giftar mammur fingu foreldramyndugleika yvir børnum sínum í 1922. Í øldir vóru tær at sammeta við nútíðar ógiftar pápar.
- At talið á ókendum pápum er hægst undir seinna heimsbardaga.

Tá ógiftar mammur enn í dag einsamallar hava foreldramyndugleika yvir børnum sínum, hevur hetta sostatt eina sera langa siðvenju, ið meginpartin av tíðini hevur snúð seg um at eggja kvinnum og monnum til einans at eiga børn í hjúnaløgum, men sum við tíðini er endað við tí øvuta: at fleiri og fleiri børn verða fødd uttan fyri hjúnalag.

### Rættindi og skyldur í dag og framyvir

Í dag verður roynt at allýsa og greina foreldraleiklutin, m.a. á henda hátt:

> *Lívfrøðiligi og íleguligi foreldraleikluturin kann kanska tykjast einfaldastur at taka støðu til, men við nýggjari tøkni er hann kanska tann mest fløkjasligi: Lívfrøðiligi og íleguligi pápin er sami persónur – hann sum lat sáðkyknuna til barnið, meðan lívfrøðiliga mamman nýtist ikki at verða tann íleguliga mamman. Tá talan er um sokallaða „klekingarmammu“ er hon ein lívfrøðilig mamma, meðan hon, ið læt egg til barnið er íleguliga mamman.* ▸

## Fødd innan- og uttanfyri hjúnarlag

266 børn (39,1%) vóru fødd innanfyri hjúnarlag meðan 410 (60,2%) vóru fødd uttanfyri hjúnarlag í 2019. Tølini fyri 2018 vóru ávíkavist 301 (44,1%) og 378 (55,5%).

Hesi tøl í % hava seinnu árini verið:

| Ár | Innan hjúnalags | Uttan hjúnalags | Ikki upplýst |
|---|---|---|---|
| 2019 | 39,1 | 60,2 | 0,7 |
| 2018 | 44,1 | 55,5 | 0,4 |
| 2017 | 44,9 | 54,6 | 0,5 |
| 2016 | 46,2 | 53,7 | 0,1 |
| 2015 | 44,3 | 55,7 | 0,0 |
| 2014 | 43,5 | 56,5 | 0,0 |
| 2013 | 41,1 | 58,6 | 0,3 |
| 2012 | 41,7 | 58,1 | 0,2 |
| 2011 | 42,5 | 56,3 | 1,2 |
| 2010 | 43,3 | 55,2 | 1,5 |
| 2009 | 48,5 | 50,9 | 0,6 |
| 2008 | 44,5 | 55,1 | 0,4 |
| 2007 | 48,5 | 50,9 | 0,6 |
| 2006 | 49,7 | 49,9 | 0,4 |
| 2005 | 49,7 | 49,0 | 1,3 |

*Keldur: Føðifráboðanir frá jarðarmøðrunum á teimum føroysku sjúkrahúsunum og Landslæknin*





*Myndirnar vísa trý ymisk dømi um faðirskapsviðmerkingar í kirkjubókum: Ein noktaði, men broytti síðan meining, ein annar noktaði og ein triði viðgekk faðirskapin. Krossur merkir, at barnið doyði stutt aftaná. Dømini eru úr føroyskari kirkjubók frá 1860-unum.*

### Børn fødd ókend mamma 1500-1806




### Børn fødd ókendur pápi 1590-2022




*633 ókendar mammur eiga 1340 børn & 631 ókendir pápar eiga 630 børn millum 1500 og 2022.*

*Sosiali foreldraleikluturin hevur til allar tíðir – antin tað var óformligt ella formligt við ættleiðing – verið ein máti at átaka sær foreldraleiklut, uttan lívfrøðiligt/ilegubundið tilknýti til eitt barn.*

*Og rættarligi foreldraleikluturin spennir søguliga frá, at einans giftir pápar og ógiftar mammur høvdu foreldramyndugleika til egin børn, meðan giftar mammur ongan høvdu, eins og í dag, at ógiftir og samkyndir sam-pápar heldur ikki hava foreldrarættindi, men har møguleiki er fyri at hava tvær mammur – eisini nevndar sammøður.*

Í uppskotinum hjá teimum 10 tingfólkunum úr andstøðuni: Javnaðarflokkinum, Tjóðveldi og Framsókn, ið bleiv samtykt 20. des. 2021, er endamálið m.a. lýst soleiðis: "…*at børn hjá samkyndum fáa rætt til tvey foreldur frá føðing, og at samkyndar kvinnur fáa foreldramyndugleika til síni børn frá føðing…*"

Her síggja vit, hvussu broyttar fyritreytir fyri gitnaði, barnsburði, parlagi o.s.fr. hava stóra ávirkan á viðurskifti millum børn og mammur – og at samkyndir pápar ikki vóru umfataðir av uppskotinum um foreldramyndugleika til sammøður. Vit kunnu tí ikki annað enn ímynda okkum, at hetta, og mong onnur viðurskifti hesum viðvíkjandi, framyvir javnan mugu endurskoðast innan lóggávu og mannagongdir á økinum.

Í Ættarbandsskránni, sum nú sæst á Samleikavanganum, síggjast í løtuni – í tann mun tað ber til – ílegulig foreldur, og í núverandi forriti ber heldur ikki til at hava foreldur av sama kyni. Har íleguligg foreldur eru ókend, stendur antin onki, ókend/ókendur ella ættleiðingarforeldur. Til ber heldur ikki at vísa tvey foreldrapør, ella einans ættleiðingarforeldrini, tá tey íleguligu eru kend, sum fleiri ættleidd hava sett fram ynski um.

Sum fortíðin, nútíðin og framtíðin síggja út, er og verður kanska óvíst um „*Mater semper certa est*".



*Brot úr Dimmalætting 1946 har lýst verður eftir bretskum hermonnum, í.s.v. faðirskapssakir.*

# Tíðarlinja

**2021**
20. des.: Uppskot til løgtingslóg um sammøður samtykt í løgtinginum

**2017**
30. mai: Hjúnabandslógin sum loyvir samkyndum at giftast, samtykt

**1960**
– P-bollin verður leysgivin í Danmark
– Nýggj barnalóg har heitið "uægte" ikki longur kann brúkast um børn fødd uttanfyri hjúnalag

**1937**
- Forsyrgjaraskylda hjá sóknum frá 1844 fellur burtur
- Loyvt at nýta blóðroynd fyri at staðfesta faðirskap
- Nýggj barnalóg javnstillaði í størri mun børn í og uttanfyri hjúnalag í.s.v. arv.

**1922**
Giftar mammur sama foreldramyndugleika sum ógiftar mammur – og sama sum giftir pápar ísv. hjúnaskilnað

**1919**
Faðirskapssakir avgjørdar við dómi. Ikki longur møguligt at avnokta faðirskap við at svørja á bíbliuni

**1908**
Einkjur, sundurlisnar- og nýgiftar kvinnur fáa rættindi til foreldramyndugleika yvir egnum børnum

**1880**
Søla og keyp av hítum loyvt í Danmark

**1857**
Ógiftar 25 ára gamlar kvinnur myndugar

**1849**
Fátækrahjálp verður ein grundlógartryggjaður rættur

**1846**
"Forordning angaaende Adskilligt Agerdyrkningen og Tienestefolk med videre paa Færøe vedkommende" avtikin

**1844**
10. mánaðarreglan um forsyrgjaraskyldu hjá sóknum fyri børn fødd uttanfyri hjúnalag

**1828**
Navnalóg har patronym-eftirnøvn steðga til frama fyri varandi eftirnøvn

**1812**
Peningabót fyri 1&2 legumál avtikin

**1777**
„Forordning angaaende Adskilligt Agerdyrkningen og Tienestefolk med videre paa Færøe vedkommende"

**1767**
Lógarbroyting: Alment skriftamál fyri legumál avtikið

**1735**
Navn á mammu eisini skrásett í kirkjubók

**1687**
§ 2-8-7 í Norsku lóg hjá Christian V um at føra kirkjubøkur

**1683**
Christian 5.s Danske Lov. Framvegis revsivert at hava samlegu uttanfyri hjúnalag – dupulta revsing, men møguligt at avnokta faðirskap við at svørja á bíbliuni

**1617**
Peningabót fyri 1&2 legumál. Kákstrúking fyri 3 legumál

**1536**
Trúbótin: Samlega millum hjúnafelagar ein gáva frá Guði – annars brotsverk móti heilaga hjúnalagnum og revsivert. Møguligt at avnokta faðirskap við at svørja á bíbliuni

**1500**
Katolicisma: endamálið við samlegu í hjúnalagnum einans at fáa børn

*Nøkur søgulig dømi, ið hava ávirkað m.a. hjúnaløg, foreldur og foreldramyndugleika.*

# JOURNALIN

## – eitt týdningarmikið hjálparamboð



**John Kjær**
johnk@skjalasavn.fo
Skjalavørður
Tjóðskjalasavnið

Journalir eru hent hjálparamboð í sambandi við gransking. Bæði tá tað snýr seg um gransking í einum savni, ella tá leitast skal um myndugleikamørk. Neyðugt er tí hjá Tjóðskjalasavninum at loysa lógaráløgdu uppgávur sínar í tøttum samstarvi við almennu fyrisitingina.

**Tjóðskjalasavnið hevur í goymslum** sínum umleið fýra kilometrar við hillum, ið eru tætt pakkaðar við skjalasavnindum. Hesi skjalasavnindi verða goymd í skjalaeskjum, sum samanlagt goyma eina nøgd, ið svarar til nærum 12 milliónir stakskjøl.

Fyri at finna runt í stóru nøgdunum er neyðugt at hava amboð, ið kunnu beina ein á rætta kós, tá leitað verður eftir upplýsingum. Tjóðskjalasavnið sjálvt skrásetur og hevur yvirlit yvir, hvar skjalasøvnini hjá ymsu myndugleikunum og stovnunum eru goymd, og hvørji tey eru, men ikki hvat innihaldið í einstøku málunum er. Skal ein leita í einstaka savninum, eru tað journalirnar hjá stovnunum, ið eru hentasta amboðið at nýta. Journalir eru tí eitt tað fremsta hjálpiamboðið hjá tí, sum í gransking síni hevur brúk fyri upplýsingum, ið finnast í søvnum, sum almennir myndugleikar hava avhent Tjóðskjalasavninum.

Tjóðskjalasavnið kann tí bert loysa lógaráløgdu uppgávur sínar í tøttum samstarvi við almennu fyrisitingina, ið skal hava gjørt grundleggjandi arbeiði sítt til fulnar, um úrslitið skal verða dygdargott.

Fortreytin fyri, at skjalasavnindini kunnu verða latin framtíðar nýtarum, er, at tey verða latin Tjóðskjalasavninum í vælskipaðum og skjalskannaðum standi. Fortreytin fyri, at neyðugar vrakingar kunnu verða gjøgnumførdar, er, at skipan av skjalasøvnunum innan fyrisitingina verður gjørd við fyriliti fyri hesum. Skjalasavnindi kunnu tó bert verða vrakað við heimild frá Tjóðskjalasavninum.

Sambært løgtingslóg skulu skjalasavnindi hjá almennum stovnum goymast og varðveitast við tí í hyggju at síggja til rættin til og tørvin á upplýsing og gransking. Tjóðskjalasavnið hevur skyldu til í tí sambandi at savna, skipa, varðveita, lýsa og røkja tey skjøl, sum almennir stovnar avhenda til savnið. Tí áliggur tað almennum stovnum at hava neyðturviligt fyrilit fyri skjalasavnindum sínum, soleiðis at tiltøk skulu setast í verk, ið tryggja, at skjalasavnindi verða varðveitt á slíkan hátt, at tey aftaná avhending til Tjóðskjalasavnið kunnu vera til taks hjá myndugleikum og almenningi og kunnu nýtast til granskingarendamál.

Stóru nøgdirnar av skjalasavnindum gera tað neyðugt at skráseta mál og skjøl sera neyvt. Bæði meðan ▸



**Mynd 1:** *Tað kemur fyri, at skjøl, ið treingja røkt, verða avhend Tjóðskjalasavninum*

### VRAKING AV SKJØLUM

*Vraking er altíð orsakað av fíggjarávum. Síðbundin skjalasavnindi krevja bygging og rakstur av goymslum, tey krevja viðlíkahald, og tey krevja at verða skipað og skrásett, umframt brúkaravegleiðingar fyri at verða gjørd atkomulig fyri granskingina. Hetta krevur fíggjarligar játtanir. Skulu øll síðbundnu skjalasavnindini hjá myndugleikum og stovnum varðveitast, krevur hetta munandi øktar játtanir. Tí kann verða neyðugt at vraka skjalasavnindi og bert varðveita tey, ið tryggja eitt gott grundarlag fyri gransking og almennum mentanarligum virksemi.*

*Tjóðskjalasavnið hevur reglugerð um vraking av ávísum skjølum hjá almennum stovnum, sum myndugleikar kunnu nýta, áðrenn teir avhenda søvn síni til Tjóðskjalasavnið. Onnur vraking av skjalasavnindum verður altíð viðgjørd sum eitt serstakt mál í hvørjum einstøkum føri.*

*„Skipanin av slíkum skjalasøvnum eigur at byggja á upprunaligu skipanina av skjalasavnindunum, sum í høvuðsheitum svarar til skipanina av tí fyrisitingarliga stovninum, sum skapti tey“*

*Cook, Terry, „What is Past is Prologue“, í Archivaria 43, spring, 1997, síða 21*

málini eru í nýtslu, og tá tey verða avhend Tjóðskjalasavninum.

## Vaksandi nøgdir

Sum samfelagsgongdin hevur verið tey seinastu hundrað árini, er mongdin av skjølum vaksin nógv. Henda gongd hevur eyðkent viðurskiftini í øllum nútímans samfeløgum.

Tær upplýsingar, ið eru at finna í einum skjali ella skjalasavnindum, eru av einum øðrvísi slagi ella náttúru enn tað, sum finst í bókum ella bløðum. Eitt skjal verður sum oftast til sum liður í viðgerðini av einumhvørjum máli. Skjalið er vanliga partur av eini røð av skjølum, sum hvørt sær kanska ikki eru so upplýsandi, men sum samlað kunnu siga nógv um eitt mál og um teir spurningar, ið málið snýr seg um, hvussu málið er íkomið sum heild, og hvussu tað er viðgjørt. Hvørt einstakt skjal goymir upplýsingar, men skjalasavnið sjálvt gevur eisini kunnleika um mál, málsviðgerð og grundarlagið undir einihvørji avgerð hjá løggávuvaldi, fyrisiting ella dómsvaldi.

Eitthvørt skjalasavn hjá stovni er annað og meira enn ein liður í fyrisitingarligari málsviðgerð. Savnið er samstundis ein heimild hjá samtíðar og framtíðar granskarum til so at siga øll sløg av vísindum. Sigast kann, at dagsins savnindi eru framtíðarinnar heimildir.

Tað hevur tí stóran týdning, at skjalasøvn hjá tí almenna - eins væl og hjá privatum - verða varðveitt og røkt á ein slíkan hátt, at tey eru atgeingilig og nýtilig so langt inn í framtíðina, sum til ber. Tað skjalatilfar, sum verður til í fyrisitingini, skal við øðrum orðum kunna nýtast eisini tann dag, tað bert hevur søguligan ella annan vísindaligan áhuga.

## Upprunameginreglan

Fyri at kunna skipa stóru nøgdirnar av skjølum, ið verða varðveittar á Tjóðskjalasavninum og samstundis hava møguleika fyri at finna runt í teimum, hevur savnið arbeitt eftir sonevnda proveniensprinsippinum ella upprunameginregluni, sum vit eisini nevna hana.

Í stuttum gongur meginreglan út uppá, at skjalasøvnini hjá stovnum og myndugleikum verða avhend Tjóðskjalasavninum eftir reglum, sum Tjóðskjalasavnið ásetur, men verða varðveitt eftir teirri skipan, sum stovnarnir nýttu, tá skjøl og mál vóru í nýtslu hjá stovnunum og myndugleikunum.

Á henda hátt ber til, at tey amboð, sum upprunaliga vórðu nýtt av myndugleikum og stovnum í sambandi við málsgerð, málsrøkt og avgreiðslu, eisini kunnu verða nýtt av granskingini í eftirtíðini sum leitingarlykil til skjalasavnið hjá hvørjum einstøkum almennum stovni.

## Eisini eldri søvn

Tað er ikki bert í nýggjari tíð og nýggjum søvnum, at leitað verður eftir upplýsingum. Granskað verður jú eisini í eldri søvnum, og har kann av og á tykjast torførari at finna upplýsingar. M.a. orsakað av tátíðar skrift og háttinum, sum myndugleikar umsótu mál teirra.

Eitt av týdningarmestu hjálparamboðunum í hesum høpi eru journalirnar, ið hava verið nýttar. Í journalunum síggjast hvørji mál eru, hvørji einstøku skjølini í málunum eru, og nær tey eru komin ▸

### AVHENDING OG GOYMSLA

*Miðfyrisitingin nýtir í dag talgildar skrásetingar- og málsskipanir, so framtíðar Tjóðskjalasavnið kemur í stóran mun at goyma øll nýggj mál í talgildum líki. Fyrstu talgildu avhendingarnar eru móttiknar, men enn bíða nógvar pappírsavhendingar fyri framman. Kanningar vísa, at meira enn tíggju kilometrar av hillum skulu nýtast um verandi pappírsnøgdir hjá lands- og kommunalum myndugleikum skulu fáast til høldar.*




*Upprunameginreglan veksur fram í 1800-talinum og hevur røtur í Fraklandi, har reglan í 1841 varð sett í verk í flest øllum skjalasavnsumsitingum. Í 1898 økist kunnleikin til meginregluna, tá teir tríggir hálendsku skjalavørðirnir Samuel Muller, Johan Feith og Robert Fruin skriva „Manual for the Arrangement and Description of Archives“ ella „The Dutch Manual“, sum vegleiðingin eisini verður nevnd.*



*Skjalagoymsla á Tjóðskjalasavninum*




ella send. Tað framgongur eisini hvør sendari ella móttakari er. Samstundis er stutt greitt frá, hvat innihaldið í skrivinum er.

Av fyrstan tíð vórðu innføringarnar í journalbøkurnar í tíðarraði, og einstøku málini vórðu ikki knýtt saman í mál. Seinni vórðu frágreiðingar um avgreiðslu knýttar aftrat innføringunum og tilvísingar til líknandi mál eisini førdar í journalirnar. Sum nøgdirnar vuksu, varð neyðugt at fáa eina veruliga málsskipan setta í verk, um myndugleikarnir skuldu hava møguleika at varðveita yvirlit yvir skriv og avgerðir. Málini vórðu tí skipað eftir evnum við frágreiðingum um avgreiðslu við skráseting av øllum skjølum á sama staði.

## Kancelliskipanin

Nýtt varð skipan, ið nevnist Kancelliskipanin. Berandi grundreglan í kancelliskipanini er, at hvørt einstakt mál fær eitt journalnummar, tá tað verður upprættað, og at øll seinni skriv, notat v.m., ið viðvíkja málinum, fáa sama nummar. Málið endar ikki, fyrr enn endalig avgerð er tikin – t.d. tilsøgn ella noktan uppá umsókn og kann sama mál tí røkka yvir meira enn eitt ár. Í journalini sæst undir málsnummarinum eitt notat ella stuttur samandráttur, ið lýsir hvørt skriv sær og fæst tí yvirlit yvir samlaðu málsgongdina.

Journalisering umfatar alt inn- og útgangandi tilfar umframt alt innanhýsis tilfar, ið er vorðið til í sambandi við málsviðgerðina. Hetta hevur við sær, at øll mál og skjøl verða skrásett og tryggjar sostatt, at málini verða varðveitt; t.v.s. at málini verða hildin samlað, og at tað er trygd fyri, at einki verður burtur ella forferst.

So tað er ikki bert sum leitiamboð, at journalin roynist væl, men eisini sum ein týðandi táttur í øllum góðum fyrisitingarsiði.

Mál kunnu jú verða viðgjørd hjá fleiri myndugleikum, ið hava samskift um ymsar spurningar. Jarðarviðurskifti kunnu t.d. verða umrødd hjá bæði fúta, amti og sorinskrivara. Tí er tað neyðugt at leita í journalum hjá øllum trimum myndugleikum fyri at fáa fullfíggjaða mynd av samlaðu viðgerðini av einum máli.

Onnur hjálpiamboð enn journalir eru sjálvsagt eisini. Nevnast kunnu kopibøkur, konsept av ymsum slag, notarialbøkur, ymiskar skrásetingarbøkur og kartotekskort fyri bert at nevna nøkur.

Nógv tilfar er talgilt og lagt út á heimasíðuna www.history.fo, so ein kann sita við hús og arbeiða við skjalatilfarinum. Til ber eisini at fara inn á lesistovuna hjá Tjóðskjalasavninum og har fáa høvi at leita í upprunatilfarinum, ið enn ikki er talgilt. Har fæst eisini hjálp og vegleiðing at nýta skrásetingarnar hjá Tjóðskjalasavninum og leiðbeining um, hvar t.d. leitast kann eftir nærri tilskilaðum upplýsingum.




## Keldulisti

Arkivteori – en innføring. Jørgen H. Marthinsen 2012 (Riksarkivarens, skriftserie 36)
Arkivdannelse og journalsystem, Rigsarkivet 1980
Kassation og bevaring i kommunearkiver, Rigsarkivet 1982
Kassation og bevaring af arkivalier – en intern vejledning. Rigsarkivet 1979
Eksamensopgave i arkivvitenskap. Ingvild Sveen 2017 (Høgskolen i Oslo og Akershus)
Dansk lokaladministration, en historisk oversigt ved Harald Jørgensen, rigsarkivar
Arkivteori, arkivsystem og arkivbeskrivelse. Trine Nesland 2012 (Høgskolen i Oslo og Akershus)
Fotnote eller tekst? Gudmund Valderhaug (foredrag Norsk Arkivråd 2012, www.arkivrad.no)
What is Past is Prologue: A History of Archival Ideas Since 1898, and the Future Paradigm Shift. Terry Cook 1997 (úr Archivaria 43 - https://archivaria.ca/index.php/archivaria/article/view/12175/13184 )
Retningslinjer for journalisering, (Journal og arkivgruppen Københavns Kommune 2014)


*Danske Kancelli var fram til 1848 einasta stjórnarskrivstova í danska kongaríkinum og avgreiddi øll stjórnarmál.*

*Kancelliskipanin er ein journaliserings- og arkiveringsskipan (goymsluskipan), ið stavar frá Danske Kancelli.*

*Skipanin verður seinni nýtt í teimum stjórnarráðunum, ið spretta úr Danske Kancelli (t.d. forsætismálaráðið, innlendismálaráðið og løgmálaráðið)*

*Men eisini staðbundnu myndugleikarnir, eitt nú amtini. nýttu skipanina.*




**Lesistovan 2010 - 2021 – vitjandi og nýtsla av skjalasavnindum.**

| Ár | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 | 2014 | 2015 | 2016 | 2017 | 2018 | 2019 | 2020 | 2021 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Lesi-stovu-gestir | 1.106 | 792 | 897 | 985 | 874 | 655 | 697 | 607 | 544 | 521 | 408 | 523 |
| Útlán til lesi-stovu | 1.125 | 1.092 | 1.724 | 2.123 | 1.293 | 1.176 | 1.104 | 893 | 538 | 595 | 539 | 716 |

# TALGILD MENNING – EIN AVBJÓÐING FYRI SKJALASØVN

## Nøkur orð um strategiskar valmøguleikar at langtíðarvarðveita talgild savnindi



**Poul Andrias Simonsen**
poulandriass@skjalasavn.fo
cand.mag.
Kt-skjalavørður
Tjóðskjalasavnið

*Menningin innan talgilda fyrisiting skapar avbjóðingar fyri varðveiting á skjalasavnsøkinum. Tjóðskjalasavnið hevur valt ein serligan framferðarhátt fyri at vinna á hesum avbjóðingum. Við hesum vali eru tó bæði fyrimunir og vansar.*

**Tá flest fólk hugsa** um skjalasøvn, síggja tey fyri sær gomul skjøl, t.d. gomul hondskrivaði brøv, myndatilfar og tekningar, men veruleikin er nógv fløktari, nógv nýggjari og nógv størri. Við grønu tilgongdini og krøvum um effektivisering, er pappírsfría skrivstovan vorðin veruleiki, serliga innan almenna fyrisiting. Hetta verður í flestum førum tulkað positivt, tí vit bæði betra um samskifti og økja um skráseting, samstundis sum vit minka um pappírsnýtsluna. Men fyri skjalasøvn kring allan heim skapar henda menning innan talgilda fyrisiting álvarsamar avbjóðingar, tá talan er um langtíðarvarðveiting. Avbjóðingar, sum ikki eru so lættar at vinna á.

At fara frá at varðveita analogt tilfar, serliga pappír, til at varðveita talgilt tilfar krevur kollveltandi broytingar, og tað gerst ikki frá einum degi til annan. Fyri sløkum 20 árum síðani fór Tjóðskjalasavnið í holt við at leita sær loysnir fyri talgildari langtíðarvarðveiting. Longu tá gjørdist greitt, at spurningurin um framferðarhátt ella strategi var av serligum týdningi at fáa avgreitt.

### Ymiskir framferðarhættir

Hóast endamálið við at varðveita talgild skjøl og skipanir sum heild er tað sama, sum at varðveita analog skjøl, so er tøkniliga avbjóðingin ein heilt onnur. Hetta sæst við at samanbera livitíðina hjá ymiskum sløgum av skjølum.

Talgilt tilfar hava vit lítlar og ongar royndir við at langtíðarvarðveita. Tí er framvegis ringt at siga neyvt, hvussu leingi talgilt tilfar kann varðveitast. Hinvegin vita vit, at talgilt tilfar fyri tað mesta forferst eftir fimm árum, um skipaninar ikki verða dagførdar.



Hetta er sera stutt livitíð samanborið við annað tilfar. Til dømis hevur pappír, sum í dag fyllir tað mesta av goymslum Tjóðskjalasavsins, vanliga eina liviðtíð á umleið 400 ár, um tað verður varðveitt rætt. Eldri skjøl, sum til dømis pergament (skinn), hava undir røttum umstøðum upp aftur longri livitíð. Eitt nú fyllir elsta skjalið á Tjóðskjalasavninum, sokallaða Seyðabrævið, 725 ár í 2023.

Eitt krav til varðveitingarhátt er, at tað ber til at langtíðarvarðveita talgilt tilfar í fleiri hundrað ár.

Umframt stutta livitíð eru eisini aðrar avbjóðingar við talgildum tilfari, sum serliga vísa seg, tá nýggj tøkni avloysir gamla. Analogar dátur, sum finnast á fysiskum miðli, til dømis maskinskrift á pappíri, kunnu vit lesa ella tulka beinleiðis bara við at hyggja at tí. Talgilt tilfar krevur harafturímóti serliga lesieind, sum kann lesa ella týða tað, fyri at vit kunnu skilja tað, líka mikið um talan er um tekst, ljóð ella myndir. Um neyðuga útgerðin ikki finst, sum kann týða upplýsingarnar fyri okkum, so hava vit heldur ikki atgongd til teirra.

Tí er eitt krav til varðveitingarháttin, at tað skal vera gjørligt at lesa talgilda tilfarið í enn ókomnum tíðum.

Tað finnast fleiri hættir at varðveita talgilt, men serliga tveir framferðarhættir eru altjóða viðurkendir og nógv útbreiddir. Annar teirra verður kallaður 'emulering' og hin 'migrering'. Báðir framferðarhættir verða brúktir í dag, men hvørgin teirra er fullkomin.[1]

### Emulering

Emulering merkir eftirgerð, og er ein varðveitingar-

1 Eisini skal sokallaði 'museali framferðarhátturin' nevnast her. Sambært hesum er neyðugt at varðveita allan tólbúna og ritbúna fyri at vera til reiðar altíð at kunna lesa talgilt tilfar. Hesin framferðarháttur verður tó ikki roknaður sum realistiskur.

**ANALOG SKJØL:**

*Hetta eru hondføst skjøl, eitt nú pappír, pergament, kasettubond osfr. Í skjalasavnshøpi verður tó fyrst og fremst hugsað um pappír*

### EMULERING:

*Hugsanin við emulering er at menna nýggj forrit, ið kunnu eftirgera gamla tøkni. Á henda hátt verða upprunatøkni og forrit varðveitt til komandi tíðir at lesa og tulka. Emulering verður tó bara brúkt av fáum skjalasøvnum.*

háttur, sum leggur dent á *tøkniliga* eftirgerð. Gomul forrit og gamlar stýrisskipanir verða eftirgjørd í nýggjum høpi, so at tey stíga fram á sama hátt sum upprunaliga.

Hesar eftirgjørdu skipanir skulu sniðgevast soleiðis, at tað ber til at binda saman ymiskar stýrisskipanir og ymisk tøknilig ættarlið. Eisini skal eftirgerðin sniðgevast soleiðis, at tað ikki er neyðugt at varðveita uppruna tólbúna og stýrisskipanir, sum dáturnar upprunaliga vórðu framleiddar í.

Emulering hevur ikki einans sum endamál at varðveita innihald, men eisini at varðveita tann form og estetikk, sum fanst upprunaliga. Aðalmálið í emulering er sostatt at varðveita brúkarauppliving og funktionalitet, og at tryggja sær, at hesi viðurskifti eru so tætt tí upprunaliga, sum til ber.

Emulering er sostatt gott í samsvar við skjalasavnsmeginregluna um '*respect des fonds*', ið merkir at varðveita tilfarið so nær upprunanum sum gjørligt.

## Migrering

Migrering merkir flyting, og setur innihald heldur enn form í miðdepilin. Heilt einfalt snýr migrering seg um at flyta talgildar upplýsingar frá einum tøkniligum palli til ein annan, nýggjari pall – ella frá eldri ættarliði av teldutøkni til yngri. Hugsanin við migrering er brúkarafunktionalitetur, ella við øðrum orðum at tað skal verða lætt at finna upplýsingar aftur.

Migrering verður nógv brúkt sum varðveitingarháttur í størsta partinum av Vesturheiminum. Áður hava skjalasøvn í Europa arbeitt við hvør sínari migreringsstrategi, millum annað við ymiskum standardum. Seinastu árini hevur ES tikið stig til eitt felags europeiskt samstarv á skjalasavnsøkinum við tí endamáli at fáa í lag ein felags, relativt standardiseraðan varðveitingarhátt. Verkætlanin tekur útgangsstøði í einum standardi, nevndur SIARD, ið er ein sveisiskur standardur, sum byggir á XML fílir og SQL skrift.

Orsøkin til, at ES hevur valt júst SIARD sum standard, er smidleiki. Londini í ES eru sera ymisk, og SIARD-krøvini eru gjørd soleiðis, at tað ber til at tillaga standardin til júst tann tørv, sum hvørt einstakt land hevur, uttan at neyðugt er at broyta konceptið sum heild. Sambært SIARD skulu dátugrunnar og skipanir flytast yvir til tey standard format, sum eru góðkend. Dátugrunnurin skal vera ein relatiónsdátugrunnur við tabellum, ið hava relatiónir ella samband hvør við aðra.

Av tí at tað ber til at tillaga standardin til tey viðurskifti, sum eru í hvørjum landi sær, hevur eitt nú Danmark egnan standard, ið nevnist SIARDdk.



*Testverkstaðurin á Tjóðskjalasavninum. Her verða talgildu skjalasavnsútgávurnar testaðar, góðkendar og síðani gjørdar klárar til langtíðarvarðveiting.*

## Hvussu verður so valt at arbeiða

Bæði emulering og migrering hava verið frammi sum hugtøk, líka síðani byrjað var eina ferð í 1970-unum at hugsa um talgilda varðveiting.

Emulering kann gerast ein sera kostnaðarmikil framferðarháttur, tí nýggir emulatorar, ið kunnu endurgera gamla tøkni, skulu mennast, so hvørt sum tøknin broytist. Tí verður emulering mest brúkt í øðrum høpi enn langtíðarvarðveiting, til dømis í sambandi við telduspøl.

Flestu skjalasøvn vilja heldur ikki fara undir at menna emulatorar í kapping við stórar altjóða fyritøkur sum eitt nú Microsoft og Apple. Hóast nøkur fá skjalasøvn brúka emulering, og onnur bara nema við økið, er emulering ikki ein framferðarháttur, ið nógv skjalasøvn brúka.

Við emulering hevði møguliga borið til at varðveitt dátur og skipanir nærri upprunaformatunum. Óvissan, um tað yvirhøvur fer at bera til at emulera alt tilfarið í framtíðini, og vandin fyri høgum rakstrarkostnaði tala ikki fyri at brúka henda framferðarháttin. Migratión hinvegin hevur tann fyrimun, at man kann lena seg uppat standardiseringum og kravsetingum, sum eru amboð, ið skjalasøvn eru von við at arbeiða eftir. Vansin við migrering er kortini, at man lættliga kann enda við at mála seg upp í ein krók, um man velur skeivar standardir at arbeiða eftir.

## Migrering í Føroyum

Longu fyri 13 árum síðani peikaði Tjóðskjalasavnið á migrering sum varðveitingarhátt. Orsøkin var, at flest øll evropeisk lond, teirra millum Danmark, gingu hesa leið. Sjálvt um valið í framtíðini fer at føra við sær ávísar avmarkingar við atgeingi og miðling, eru viðurskifti, sum tala fyri migrering sum bestu loysnini her og nú. Fíggjarliga er migrering eisini betri enn emulering, partvís tí tað ikki krevur so nógva menning, og partvís tí at Føroyar fyri tað mesta fáa ágóðar av samstarvinum við bæði Danmark og londini í Útnorðuri, sum øll brúka somu standardir.

Migrering sum framferðarháttur er tó ikki uttan avbjóðingar. Til dømis eru ikki øll format líka væl egnað til at langtíðarvarðveita dátur. Tí hevur tað sera stóran týdning at avmarka úrvalið av formatum og stýriskipanum hjá almennum myndugleikum til tey sløg, sum lúka treytirnar fyri langtíðarvarðveiting í migreringshøpi.

Skipanir hjá myndugleikum skulu metast av Tjóðskjalasavninum, áðrenn tær verða tiknar í brúk. Tí er neyðugt, at stovnar søkja Tjóðskjalasavnið um góðkenning av nýggjum skrásetingarskipanum, áðrenn myndugleikarnir taka skipanirnar í brúk. Samstundis eigur Tjóðskjalasavnið sjálvt eisini at eftirkanna, hvørjar skipanir eru í almenna geiranum, so at Tjóðskjalasavnið veit, hvør tólbúnaður, ritbúnaður og hvørji format, ið verða brúkt. Hetta skal tryggja, at tað ber til at fremja migreringskonceptið á optimalan hátt.

Hetta rímar væl við eitt av høvuðsendamálum Tjóðskjalasavnsins, sum er at langtíðarvarðveita fyrisitingarligar viðgerðir og avgerðir. Av tí at slíkir upplýsingar kunnu hava avgerandi fyrisitingarligan, rættarligan og søguligan týdning, hevur tað eisini stóran týdning, at Tjóðskjalasavnið veit, hvørjar skipanir og hvørji format eru til, áðrenn avgerð verður tikin um, hvat skal varðveitast og hvussu.

Av tí at Føroyar, bæði fyrisitingarliga og sum samfelag, líkjast nógv Danmark, verður SIARDdk brúktur her á landi.

### FLEIRI FRAMFERÐARHÆTTIR:

*Møguleikarnir eru tríggir:*
*'Emulering', 'migrering' og 'musealur framferðarháttur'.*
*Museali hátturin, sum er mest í samsvar við 'upprunameginregluna' hjá skjalasøvnum, verður ikki mettur realistiskur, tí hann krevur, at ritbúnaður og tólbúnaður verða varðveittir.*

## Hvør loysn er so betri?

Talgild varðveiting er ein stór og torfør avbjóðing. Menning innan talgilda økið sum heild hendir við rúkandi ferð, og einki bendir á, at menningartilgongdin steðgar upp skjótt, heldur tvørturímóti. Tað ber tó ikki til at standa hendur í lumma og bíða. Í verandi løtu er meira gongd á menningini innan migrering, enn tað er innan emulering. At velja migrering sum varðveitingarhátt virkar tí sum eitt bæði tryggari og bíligari val enn emulering.

Tá ið hetta er sagt, so hevur migrering sum nevnt eina stóra avbjóðing. Seinastu 20 árini hevur stórur dentur verið lagdur á sjálvan varðveitingarpartin, men tað dregur út við atgeingi og miðling. Tí er tað natúrligt, at størri dentur verður lagdur á at menna atgeingis- og miðlapartin. Heldur ikki í hesum sambandi er Tjóðskjalsavnið í bíðistøðu, men er vorðið toghaldari í útnorðurverkætlan, sum hevur til endamáls at menna júst atgeingis- og miðlaritbúna.

### Keldur


Rothenberg J. Ensuring the Longevity of Digital Documents. *Sci Amer.* 1995

Rothenberg J. *An Experiment in Using Emulation to Preserve Digital Publications.* Koninklijke Bibliotheek; Hague, Netherlands: 2000.

Vegleiðingar og kunngerðir frá Tjóðskjalasavninum

Vegleiðingar og kunngerðir frá Ríkisskjalasavninum

Sveinung Fjose, Øyvind N. Handberg og Ole Magnus Stokke: MENON-PUBLIKASJON NR. 81/2018 Menon Economics, Norra: 2018



**Karin Jóhanna Leitisstein Knudsen**
karinjohannal@skjalasavn.fo
Skjalavørður, PhD

# TVÆR KVINNU-LAGNUR
## *í 1800-talinum*

*Hví eru rættarmálini móti Christiane Jens-Christiansdatter af Thorshavn og Maren Danielsdatter af Arge áhugaverd og hugvekjandi?*

*At granska og lýsa lívsumstøður og søgur hjá føroyskum konum er av stórum týdningi. Serstakliga tí at vit fáa innlit í partar av okkara søgu og samfelagsviðurskifti, sum í nógvar mátar vantandi vitan er um. Vitan, ið vit hava tørv á fyri at skilja egnu støðu betri.*

*Fiskagentur í Vestmanna seinast í 1890-unum. Tilvildarlig mynd*

## Fongsul uppá vatn og breyð

**§ 20.** Fængsel paa Vand og Brød tilkiendes ikke under 2 Dage og ikke over 30 Dage. Den Fængslede maa ikke nyde Andet end Vand og Brød og dertil Salt. Brugen af Røgtobak tilstedes ikke.

*Revsilógin frá 1866*

### Eigur í loyndum og tekur lívið av barninum

Maren Danielsdatter af Arge er í fongsli í Danmark. Hetta er miðskeiðis í 1800-talinum. Hon er dømd 2 ½ ára fongsul fyri at eiga barn í loyndum og at taka lívið av barninum. Sambært dóminum hevur hon livað eitt lív í ólevnaði og siðloysi. Hon hevur eisini javnan framt kynslig brotsverk. Kvinnan hevur, sum tað tá á døgum verður kallað, havt ósømiligt samband við ein ungan mann, ið er um 16 ára aldur, tá barnið verður føtt. Kvinnan er um 20 ára aldur, tá hon fær fongsulsrevsing.

Í viðgongutíðini roynir kvinnan at fjala, at hon er við barn. Tá hon er spurd um sína støðu, noktar hon, at so er. Smædni og skomm hava við sær, at unga kvinnan áhaldandi noktar, at hon er við barn. Hon ger av at eiga í loyndum. Um barnið er á lívi, ætlar hon at gera av við barnið og seg sjálva. Um barnið er deyðføtt, hevur kvinnan í hyggju at burturbeina barnið uttan at siga tað fyri nøkrum. Tað er ongantíð í hennara tonkum, at um barnið er á lívi, so tekur hon einans lívið av barninum. Men tað er júst tað, ið unga kvinnan endar við at gera.

Ta fyrstu tíðina, meðan hon er í fongsli í Danmark, leingist henni heim til Føroya og eftir sínum kæru. Hon stúrir eisini fyri skommini, tá hon hevur sitið dómin. Sum tíðin gongur, er kvinnan verri og verri fyri sálarliga. Tá prestur úr Føroyum vitjar hana í fongslinum, er hon líkasæl og ber agg til síni nærmastu.

Eitt tíðarskeið, meðan hon er í Danmark, er hon løgd inn á sinnissjúkrahús. Hon hevur hallusinatiónir, hoyrir røddir, ið tosa niðrandi um seg, og kennir seg forfylgda. Kvinnan fær álvarsama depressión.

Hon situr dagin langan á einum bonki og hyggur fram fyri seg og er líkasæl við tað, ið fer fram rundan um seg. Hon er ill av sær og vil ikki hava aðrar sjúklingar ov tætt uppá. Hon styggir fólk frá sær og hevur lítlan áhuga í *sínum nærmastu.* Læknarnir á sinnisjúkrahúsinum meta, at sinnissjúkan mest sannlíkt er ein varandi apatisk sinnisstøða hjá kvinnuni.

Heima aftur í Føroyum livir Maren Danielsdatter av Argjum av fátækrahjálp. Hon doyr einans 27 ára gomul.

### Samfelagið broytist

Tátíðarinnar samfelag førkar seg spakuliga frá at fordøma kvinnur, ið eiga í loyndum, til at royna at skilja kvinnurnar. At eiga í loyndum og gera av við barnið kundi eisini vera tekin um fátækradømi, ræðslu og skammarkenslur, eins og ótti fyri einum lívi í armóð og fátækradømi.

Broyttur hugburður til tílíkar brotsgerðir hevði við sær, at eisini dómsvenja broyttist. Hørð revsing vísti seg ikki at forða fyri, at kvinnur áttu í loyndum og tóku lívið av barninum.

Í 1700-talinum broyttist revsingin fyri at eiga barn í loyndum og gera av við barnið frá beinleiðis avrætting til nøkur ára arbeiði í tukthúsi. Revsingin fyri at eiga í loyndum broyttist aftur við revsilógini í 1866.

### Í fongsul upp á vatn og breyð í 7 dagar

Próst Djurhuus meldar ógiftu Christiane Jens-Christiansdatter af Thorshavn:

> *„Herved skulle jeg ikke undlade ærbödigst at indberettes til det höie Amt, at ugift Fruentimmer Christiane Jens=Christiansdatter i Thorshavn 3de Gange har begaaet Leiermaal med forskjellige mandspersoner.“*

Hetta er eisini miðskeiðis í 1800-talinum. Kvinnan er mitt í tríatiárunum. Hon hevur í hesum føri framt sítt triðja legumál [samlega uttan fyri hjúnaband]. Hvørt legumálið er við ymiskum monnum. Kvinnan hevur fingið trý børn; eitt barn við hvørjum manni.

Eftir boðum frá Amtinum er kvinnan kallað inn til forhoyr fyri at staðfesta, um hon er sek í at fremja legumál fyri triðju ferð. Sum prógv er drigið fram, at hon hevur latið 3 børn doypa í kirkjuni í ávikavist 1849, 1856 og 1863. Kvinnan játtar, at hon er mamma at teimum trimum børnunum, sum standa í dópsbrøvunum.

Kvinnan leggur afturat, at ein av pápunum at hennara børnum er deyður, ein er í tukthúsi í Danmark, og ein er heima í Føroyum. Undir *forhoyrinum* váttar dómarin rættleikan av tí, ið kvinnan tekur fram um páparnar at børnunum hjá sær.

Christiane Jens-Christiansdatter er spurð, um hon ynskir, at sakarmálið verður tikið upp til dóms ella verður viðgjørt við fyrisitingarligari avgerð. Kvinnan vil, at málið verður viðgjørt við fyrisitingarligari avgerð. Revsingin, sum kvinnan fær fyri at hava fingið trý børn uttanfyri hjúnaband er sjey dagar í fongsul upp á vatn og breyð:

> *„Til – Amtmanden over Færøerne*
> *Vi giver Dig hermed tidende, at Vi efter Din derom gjorde allerunderdanigste Indberetning allernaadigst ville have Christiane Jens-Christiansdatter af Thorshavn under det dig anbetroede Amt eftergivet den Straf, som hun for med Tre forsjellige Mandspersoner at have avlet uægte Børn efter Loven har gjort sig Skyldig til at lide, imod at hun hensættes i Fængsel på Vand og Brød i 7 Dage.*
>
> *28. Juni 1864, adm.“*

Revsingin fyri fyrsta og annað legumál var sett úr gildið í 1812. Grundgevingin var, at tað var skeivt av statinum at revsa foreldur at einum nýføddum barni, hóast *barnið* var *føtt uttan fyri hjúnaband.*

Revsingin fyri fyrsta og annað legumál var revsing við sekt. Hetta kundi hava við sær, at tað gjørdist trupult hjá foreldrunum at forsyrgja barninum.

Revsingin fyri triðja legumál varð ikki sett úr gildi fyrr enn í 1866. Tað er revsing fyri triðja legumál, ið Christiane Jens-Christiansdatter fær, tá prestur meldar hana.

Christiane Jens-Christiansdatter af Thorshavn doyr 70 ára gomul.

## Kvinnufongsul á Christianshavn

Í rundskrivi frá 20. august 1870 staðfestir danska løgmálaráðið, at allir kvinnuligir lógbrótarar, ið eru dømdar revsiarbeiði, skulu sita revsingina í fongslinum á Christianshavn.

*Ældre fængsels-arkiver, 1965*

„Í viðgongutíðini roynir kvinnan at fjala, at hon er við barn. Tá hon er spurd um sína støðu, noktar hon, at so er. Smædni og skomm hava við sær, at unga kvinnan áhaldandi noktar, at hon er við barn. Hon ger av at eiga í loyndum.“

## Eiga í loyndum

§ 194. Naar et udenfor Ægteskab besvangert Fruentimmer føder i Dølgsmål [í loyndum], og Barnet derefter findes at være dødt, uden at det kan oplyses, at Døden er indtraadt før Fødslen, straffes hun, forsaavidt hendes Forhold iøvrigt ikke medfører høiere Straf, med Forbedrings-huusarbejde eller under formildende Omstændig-heder med Fængsel, dog ikke under 4 Maaneders simpelt Fængsel.

*Revsilógin frá 1866*

**Keldur**

Almindelige borgerlige Straffelov af 10. Februar 1866.

Beretning fra Kontoret for Fængselsvæsnet om Straffeanstalternes Tilstand i Tidsrummet fra 1ste Januar 1857 til 31te Marts 1863. Kjøbenhavn, pp. 130-131.

Dom-Protocol for Færøernes Sorenskriveri 1866 – 1885, folio 28-31. Sorinskrivarin, He, Dom- og kendelsesbøger, L0002, Domprotocol 24.04.1866 – 06.05.1885.

Fólkateljing, 1870, Streymoyar sýsla, Færø amt, https://www.history.fo/stutt-um-historyfo

Justitsministeriet, 2. Ekspeditionskontor, Færø-journalsager, 4, No. 201., FAJ 1863, No. 719.

Kirkjubók fyri Suðurstreymoyar prestagjald, https://www.history.fo/stutt-um-historyfo

Kjær, Morten, Nordisk tidsskrift for kriminalvidenskab, 105(3), 357–374, https://tidsskrift.dk/NTfK/article/view/120571

Koefoed, Nina Javette, 2008, Besovede kvindfolk og ukærlige barnefædre: Køn og ret i dansk ægteskabs- og sædelighedslovgivning i det lange 18. Århundrede.

Ældre fængselsarkiver fra København og Møn, Foreløbige arkivregistraturer udgivet af landsarkivet for Sjælland, København, 1965.



*Jarðarmøðurprotokollirnar á Tjóðskjalasavninum, sum ganga aftur til einaferð í 1870-árunum, innihalda viðkvæmar persónupplýsingar. Hesar upplýsingar hava verið brúktar til nógv ymisk sløg av gransking, m.a. kanningar av burðarvekt.*

# GOYMD ELLA GLOYMD

## Um varðveiting av persónupplýsingum



**Sámal Tróndur Finnsson Johansen,**
SamalTrondurJ@skjalasavn.fo
Cand.scient.soc.
(søgufrøðingur og geografur)
Tjóðskjalavørður

*'Rætturin at verða gloymd' ógildar ikki onnur atlit, t.d. 'skylduna at verða varðveitt'.[1] Hvørki ásetingarnar í dátuverndarlóg ella í GDPR skúgva ásetingarnar í skjalasavnslógini um varðveiting av persónupplýsingum til viks. Tí eigur at bera til at varðveita tær persónupplýsingar, sum Tjóðskjalasavnið metir neyðugt. Hetta er umráðandi, tí varðveiting av persóndáta hevur stóran týdning fyri menningina av vitanarsamfelagnum.*

1 Orðingin 'rætturin at verða gloymd', vísir kallinavnið fyri grein 17 í GDPR, meðan orðingin 'skyldan at verða varðveitt' vísir til hvussu ein vanliga tulkar lógina um skjalasøvn, tá tað snýr seg um varðveiting av persónupplýsingum.

### Ivandi fatanir

Verksetingin av GDPR (General Data Protection Regulation) og seinastu føroysku dátuverndarlógini hevur í ávísan mun sátt iva millum fólk, um tað er lógligt at varðveita persónupplýsingar. Tey vita ikki, hvussu tey skulu tackla tvey mótsattrættaði krøv, annað um at varðveita sambært lógini um skjalasøvn og hitt um at strika persónupplýsingar sambært dátuverndarlógini. Eitt av úrslitunum er, at summi fólk eru farin at seta spurnartekin við, um varðveiting av persónupplýsingum í heila tikið er ein møguleiki. Hesar ivandi fatanir finnast nógva staðni og ávirka bæði vanlig fólk og myndugleikar.

Fleiri fólk halda, at tey kunna krevja at fáa upplýsingar sínar strikaðar, antin tá tey ynskja tað, ella í seinasta lagi tá myndugleikin, sum hevur upplýsingarnar, ikki hevur brúk fyri teimum til upprunaliga endamálið. Tjóðskjalasavnið hevur fingið áheitanir frá almennum myndugleikum, sum hava spurt, um tey kunnu strikað upplýsingar um ávísar persónar. Tann skrásetti hevur vent sær til teirra við fyrispurningi um at fáa sínar skrásetingar strikaðar. Henda hugsan er sum oftast grundað á eina fatan av, at sokallaði 'rætturin at verða gloymd', sum er staðfestur í GDPR og dátuverndarlógini, er friðhalgaður og nærum óavmarkaður. Tí halda tey eisini, at henda áseting ógildar allar aðrar ásetingar, herundir tær sum snúgva seg um varðveiting í lógini um skjalasøvn. Hóast Tjóðskjalasavnið í serligum førum ger undantøk, so fáa myndugleikar vanliga at vita, at tey skulu avhenda skjøl ella skipanir sínar til Tjóðskjalasavnið, áðrenn tey fara í holt við at strika nakrar upplýsingar í síni skráseting.[2]

Eisini eru summir myndugleikar farnir at seta spurnartekin við heimildir Tjóðskjalasavnsins at krevja inn skjøl og skipanir við viðkvæmum persónupplýsingum. Onkur hevur enntá noktað at avhenda til Tjóðskjalasavnið. Tey vísa eisini á, at GDPR ella dátuverndarlóg áleggja teimum at strika viðkvæmar persónupplýsingar sohvørt. Tjóðskjalasavnið hevur greitt hesum myndugleikum frá, at tey hava skyldu at avhenda, og at tað ikki er upp til teirra at taka avgerð um, hvat skal varðveitast, og hvat skal vrakast.

2 Undantøk kunnu gerast, tá talan er um avhending av analogum skipanum og pappírsskjølum, tí tá skal kanska (nógv) vraking fremjast. Orsøkin til hetta er, at tá talan er um avhending av analogum tilfari, so er neyðugt at spara so nógv goymslupláss sum gjørligt. Hinvegin, tá talan er um kt-skipanir, verða tær vanliga avhendaðar í fullum líki, um ikki okkurt er í vegin við teimum. Orsøkin til hetta er, at tá talan er um kt-tilfar, so er goymslupláss ikki hin størsta avbjóðingin.



*Flestu persónupplýsingar, sum verða nýttar sum grundtilfar til Ættarbandsskránna, stava frá keldum, ið verða varðveittir á Tjóðskjalasavninum, t.d. kirkjubøkur. Ættarbandsskráin er ein av størstu uttanhýsis fíggjaðu verkætlanum á Tjóðskjalasavninum.*

### Heimildir at varðveita persóndáta

Áðrenn vit fara víðari, skulu vit líka hyggja nærri at, um GDPR og dátuverndarlóg veruliga eru so fastsmíðaðar, sum fólk halda, tá tað kemur til 'rættin at verða gloymd'. ▸

Sum útgangsstøði hava dátuverndarlóg og GDPR tað til felags, at tey verja hin skrásetta í sambandi við viðgerð av persónupplýsingum. Báðar hava tær ásetingar, sum siga, at skrásetti hevur rætt til at fáa sínar persónupplýsingar strikaðar. Dátuábyrgdari (myndugleikin) hevur skyldu til, uttan drál, at strika somu upplýsingar, um tær ikki longur tæna uppruna endamáli sínum, ella tí at skrásetti hevur tikið aftur samtykki sítt.[3]

Hinvegin eru ásetingarnar um strikan ikki galdandi, um tilfarið verður mett at skula á skjalasavn.[4] Tá verður ´Rætturin at verða gloymdur' skúgvaður burtur sambært bæði dátuverndarlóg og GDPR. Umframt nevndu ásetingar, so hevur GDPR eisini serligar ásetingar í §89, sum regulerar viðgerð av persóndáta til skjalasavnsendamál. Í føroysku dátuverndarlógini §20 stendur eisini heilt greitt, at: „*Persónupplýsingar fevndar av løgtingslógini (dátuverndarlógini, ritstj.) kunnu flytast til goymslu í skjalasavni sbrt. løgtingslóg um skjalasøvn.*“[5]

Sjálvt um nógv halda, at dátuverndarlóggávan bert snýr seg um strikan, so eru eisini týðiligar ásetingarnar í hesi lóggávu um varðveiting sambært skjalasavnslóg. Bæði føroyska dátuverndarlógin og evropeiska dátuverndarreglugerðin heimila sostatt varðveiting av persónupplýsingum. Hin fyrra við tilvísing til føroysku lógina um skjalasøvn, hin seinna við tilvísing til serlig skjalasavnsatlit og samfelagsáhugamál. Endaliga avgerðin um, hvat skal varðveitast, og hvat skal vrakast av skrásetingum myndugleikanna, herundir í persónupplýsingum, skal gerast sambært ásetingum í lógini um skjalasøvn, tvs. av tjóðskjalavørðinum ella landstýrismanninum.[6]

## Skyldan at avhenda

Allir stovnar í Føroyum, herundir tey sum røkja uppgávur fyri myndugleikar og tey sum (partvís) eru fíggjaði av tí almenna, hava skyldu at avhenda sínar skrásetingar til Tjóðskjalasavnið. Tað er tjóðskjalavørðurin, sum ger ásetingarnar, og undantøk frá hesum kunnu bert gevast við loyvi frá landstýrismanninum. Somu myndugleikar hava eisini skyldu til at boða Tjóðskjalasavninum frá, tá tey taka í brúk nýggjar skipanir til skrásetingar. Á henda hátt fær Tjóðskjalasavnið eitt so gott grundarlag sum gjørligt at taka støðu til, hvat eigur at varðveitast, og hvat møguliga skal vrakast.[7]

Stórur partur av tí, sum hevur verið avhent til Tjóðskjalasavnið higartil, eru persónupplýsingar, partvís í journalskipanum, men serliga í ymiskum fakskipanum. At taka ímóti persónupplýsingum hevur verið ein partur av virksemi stovnsins heilt frá byrjan. Sum frá er liðið eru slíkar seriur av persónupplýsingum vaksnar nógv. Hetta kemst sjálvandi fyrst og fremst av vøkstrinum í fyrisitingini.

3 Sí dátuverndarlóg §28 og GDPR grein 17 (‘rætturin til at verða gloymd’), í báðum førum verður víst til stk. 1.

4 Sí aftur GDPR grein 17 og í dátuverndarlógini §28. Hesaferð stk. 3 í báðum førum. – Orsøkin til at GDPR grein 17 og dátuverndarlóg § 28 líkjast so nógv, er at føroyska dátuverndarlógin er grundað á, og í stóran mun ein avskrift av GDPR.

5 Sí dátuverndarlóg §20.

6 Ein avbjóðing kann gerast §7 stk.1 í Kunngerð 177, 1995 um virksemið hjá Føroya Landsskjalasavni. Ringt er at siga, hvussu henda áseting skal tulkast.

7 Sí m.a. lógina um skjalasøvn §§ 1,5 og 6 1992/2018.




*Í faðirskapsmálum eru nógvar viðkvæmar persónupplýsingar. Verða hesar ikki varðveittar, kunnu tey, sum av persónligum ávum hava brúk fyri teimum, t.d. finna familju, ikki brúka faðirskapsmálini. Eisini í granskinghópi missa upplýsingarnar virði, um persóneykennið verða strikað í upprunaskjølunum (Skjalasavn: Fútin, faðirskapsmál).*



*Persóneyðmerking líkamikið ella grundleggjandi? Á hesi røntgenmynd, sum vísir tannstøðu hjá persóni undir viðgerð av sertannlækna, eru m.a. persónupplýsingar (navn og føðidato) skornir burtur. Um hetta varð gjørt við allar slíkar myndir, sum finnast í hópatali, varð nýtsluvirðið í granskingarhøpi samstundis minkað nógv (Skjalasavn: Bergtóra Hanusardóttir, sertannlækni).*

## Trý dømi um varðveittar persónupplýsingar

At bæði dátuverndarlóg og GDPR loyva varðveiting av viðkvæmum persónupplýsingum og at hesi regluverk eisini vísa til skjalasavnsvirksemi og lóg um skjalasøvn, er við til at legitimera varðveiting av persónupplýsingum. Hinvegin finst enn ein viss skepsis millum fólk, serliga mótvegis varðveiting av rúgvismikilum tilfari í talgildum líki.

Í eini roynd at gera hetta eitt sindur minni duldarfult, skulu vit hyggja nærri at trimum konkretum dømum, sum kunnu vísa fyrimunir við at varðveita og brúka standardiseraðar persónupplýsingar til annað endamál enn tað, sum skjølini upprunaliga vóru ætlað til.

## Dømi 1: Faðirskapsmál v.m.

Fyrst skulu vit hyggja at brúki av sokallaðum faðirskapsmálum, sum stava frá Fútanum. Sambært lóg frá 1937 var upprunaliga endamálið við hesum skjølum, umframt at staðfesta faðirskap fyri børn født uttanfyri hjúnalag, eisini at staðfesta, hvør hevði skyldu at gjalda undirhald og at tryggja barninum møguleika til at arva biologiska pápa sín.

Hóast faðirskapur í flestu førum varð staðfestur og kanska undirhald goldið, so eru fleiri dømi um, at einki samband var millum hesi børn og biologisku pápar teirra. Summi gingu tað mesta av lívinum uttan at vita, hvør pápi sín var, í flestu førum orsakað av skommini, sum fylgdi við at verða født uttanfyri hjúnalag. So hvørt, sum viðkomandi barn vaks til og kanska biologiski pápin doyði, mistu nevndu skjøl sítt upprunaliga endamál. Fleiri av hesum børnum ella av eftirkomarum teirra hava seinni brúkt upplýsingarnar í skjølunum til at finna útav hvør biologiski pápin var. Á henda hátt hava tey fingið sambandi við antin ókenda pápan ella restina av familju hansara. Hesi skjølini eru úr pappíri, og tey eru ikki so standardiserað sum onnur. Tí er avmarkað, hvussu ▸

## Keldur

General Data Protection Regulation 2018 (gdpr.dk)
Kunngerð nr. 117 frá 5. juli 1995 um almenn savnindi og virksemið hjá Føroya Landsskjalasavni
Lov nr. 502 af 24. juni 1992 om ændring af lov om erstatning til besættelsestidens ofre (Færøske fiskere)
Løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um skjalasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 30. apríl 2018
Løgtingslóg nr. 80 frá 7. juni 2020 um vernd av persónupplýsingum 7. juni 2020
Skjalasavnið hjá Bergtóru Hanusardóttir, sertannlækna
Skjalasavnið hjá Fólkakirkjuni (kirkjubøkur)
Skjalasavnið hjá Fútanum (Faðirskapsmál)
Skjalasavnið hjá Vanlukkutrygginginii

lætt tað er at leita í tilfarinum, sum er, men til ber at talgildað (t.d. skanna) tilfarið.

### Dømi 2: Mynstringar

Annað dømi um persónupplýsingar, sum hava verið nógv nýttar til annað enn upprunaendamálið, eru trygdaruppgerðirnar hjá Vanlukkutrygginginii (og fútanum/sýslunum). Upprunaliga vórðu hesar upplýsingar skrásettar fyri at tryggja hvørt einstakt sjófólk, tá tey mynstraðu. Seinni, eftir at hesi skjøl hava verið avhendað til Tjóðskjalasavnið, hava tey verið nógv brúkt av sjófólki, m.a. til at prógva siglingstíð.

Í 1992 hendi nakað, sum gjørdi, at hesi tryggingarskjøl fingu eitt heilt serligt virði. Eftir donsku lógini um endurgjald til offur fyri hersetingini undir seinna heimsbardaga kundu sokallaðir 'krígssiglarar', tvs. føroysk sjófólk ella tey sum sótu eftir teimum, fáa endurgjald. Fyri at fáa endurgjald skuldu tey prógva, at tey høvdu niðursett arbeiðsevni, sum stavaði frá krígstíðini. Tey skuldu eisini prógva, at tey í krígsárunum høvdu siglt í minst seks mánaðir í vandasjógvi. Sum prógv fyri siglingstíðina, varð skrásetingin í mynstringalistunum brúkt, við at tøppa tilfarið í leitbarar dátugrunnar. – Fleiri fólk fingu í nógv ár hampuligt endurgjald, og hetta var eisini ein kærkomin eyka inntøka fyri Føroyar sum heild, í eini av størstu krepputíðum landsins nakrantíð. – Mynstringar á Tjóðskjalasavninum eru úr pappíri, men eru ógvuliga standardiseraðar, og hóska seg tí væl til talgilding.

### Dømi 3: Kirkjubøkur

Ministerialbøkur hjá Fólkakirkjuni, eisini kallaðar kirkjubøkur, er kanska hin mest brúkti skjalabólkurin. Hesar bøkur innihalda upplýsingar um nærum øll, sum hava búð í Føroyum. Talan er um skráseting av føðing/navni/dópi og av deyða hjá øllum. Tey flestu eru eisini skrásett sum fermd og gift. Endamálið við hesi skráseting var at grundskráseta øll fólk fyri at vita, hvørji tey eru, og hvar tey eru í lívinum, ella um tey eru til. Eisini sigur henda skráseting nakað um ættarbond og familju. Tilfarið verður brúkt nógv til ymiska søguliga gransking, serliga til ættargransking.

Fyri sløkum 20 árum síðani var skjøtil settur á eina umfatandi verkætlan, sum hevði til endamáls at skráseta øll í eina felags 'føroyska ættarskrá', kallað Ættarbandsskráin. Í skránni eru í dag nærum øll, sum hava búð í Føroyum seinastu 350 árini, skrásett soleiðis, sum tey eru í ætt við hvønn annan. Tað er Íleguavnið, sum eigur Ættarbandsskránna, og tað er Tjóðskjalasavnið, sum hevur bygt hana. Skráin er ein av trimum skráum, ið virka sambært Íleguløgini.[8] Týdningarmestu grundupplýsingarnar í skránni stava frá kirkjubókunum. Eisini hevur annað tilfar verið brúkt sum grundtilfar, t.d. fólkateljingar og Landsfólkayvirlitið, og somuleiðis eru aðrar smærri ættarskráir (dátugrunnar) fløttaðir uppí Ættarbandsskránna.[9]

Upplýsingarnar í kirkjubókunum hava tí verið grundarlagið undir ílegugransking í Føroyum, og harvið eisini verið við til at betra okkara vitan um sambandi millum heilsu og okkara ílegur. Um persónupplýsingarnar í kirkjubókunum høvdu verið strikaðar, so hvørt tær ikki vórðu brúktar til sítt upprunaliga endamál, ella onkusvegna høvdu verið anonymiseraðar, so hevði ikki verið gjørligt at bygt eina álítandi ættarskrá, og tí heldur ikki verið gjørligt við ílegugransking í Føroyum. – Íleguavnið hevur lagt Ættarbandsskránna út á Vangan, soleiðis at fólk, sum hava Samleikan, kunnu fara inn á Vangan at síggja sína ætt – nakað sum hevur víst seg at verða tað mest vitjaða staðið á Vanganum.

### Analogar og talgildar persónupplýsingar

Oman fyri nevndu dømi vísa týdningin av at varðveita persónupplýsingar til annað enn upprunaliga endamálið, bæði fyri hin einstaka og fyri samfelagið sum heild. Nevnda tilfarið er ikki í talgildum formi, og tí er kanska ivasamt, um tað er fevnt av dátuverndarlóggávu á sama hátt sum talgilt tilfar. Tað ber tó til at talgilda tilfarið. Hetta kann gerast við antin at tøppa tilfarið inn, soleiðis sum gjørt varð við kirkjubøkurnar í sambandi við Ættarbandsskránna, ella við mynstringalistarnar í sambandi við krígssiglararnar. Til ber eisini at skannað upprunatilfarið og brúka tilgjørdan vitleika (Artificial Intellegence) at lesa upplýsingarnar. Hóast maskinurnar enn hava avbjóðingar við at lesa eldri hondskrivað skjøl, sum ikki eru sett upp í standardiseraðum formi, so gongur menningin skjótt innan hetta øki, og væntandi fer tí at bera til at maskinlesa slík skjøl um heilt stutta tíð. Tá henda talgilding fer at henda, skal hetta tilfar helst viðgerast øðrvísi við størri denti á tær ásetingar, sum eru um vernd av persónupplýsingum í antin GDPR ella dátuverndarlógini.

8 Hinar báðar skráirnar eru Vevnaðarskráin og Diagnosuskráin.
9 Hesir dátugrunnar eru fyri tað mesta eisini grundaðir á skjalasavnstilfar.





*Nærum øll í Føroyum eru skrásett í kirkjubókum. Tí eru hesir persónupplýsingar eisini av stórum týdningi, m.a. sum ískoyti til brúk av øðrum keldubólkum, har samleikin ikki er so greiður. Her sæst skrásetingin av deyðum kvinnum í Froðbiar Sókn í 1846. Av teimum 7 kvinnum sum doyðu í Froðbiar sókn hetta árið, doyðu tær 5 av herviligu meslingafarsóttini, sum herjaðu tað árið. (Skjalasavn: Suðuroyar Prestagjald, Froðbiar Sókn, Dublikat-ministerialbók 1844-90).*

Tjóðskjalasavnið hevur í nøkur ár fingið talgildar avhendingar frá almennum myndugleikum. Væntandi fer mongdin á talgildum tilfari skjótt at fleirfaldast. Tá fer Tjóðskjalasavnið at hava nógvar persónupplýsingar í talgildari varðveitslu. Tí hevur tað stóran týdning at upplýsa um, at Tjóðskjalasavnið hevur heimildir til at varðveita persóndáta, og samstundis at vísa á, at tað er neyðugt at varðveita persóndáta í sínum upprunaformi, heldur enn í anonymiseraðum formi. Persóndáta ber til at identifisera, og av tí at persóneyðmerkingin (navn, p-tal o.l.) er nakað, sum allir myndugleikar brúka, er hetta enn tann besti hátturin at tryggja sær, at dátugrunnarnir í framtíðini kunnu samankoyrast, til fyrimuns fyri vitanarsamfelagið.

### Niðurstøða

Orsakað av broytingum í lógarverki um persónupplýsingar, hevur ivi verið sáddur um heimildir Tjóðskjalasavnsins at áleggja almennum myndugleikum at avhenda skjøl og kt-skipanir við (viðkvæmum) persónupplýsingum inn til varðveiting.

Sjálvt um dátuverndarlóg og GDPR hava ásetingar um, at dáta skal strikast skjótast til ber, og lógin um skjalasøvn hevur ásetingar um, at alt skal varðveitast sum longst, so eru hesar lógir og reglugerðir ikki í stríð við hvørja aðra. Lógirnar stýra hvør sínum øki ella í hvør sínum tíðarskeiði av tí lívscyklus, sum skjølini hava. Ásetingarnar í dátuverndarlóg og GDPR stýra viðgerð av persónupplýsingum, meðan tær eru í brúki hjá myndugleikum. Ásetingarnar í lógini um skjalasøvn stýra, hvussu hesir upplýsingar skulu avhendast til og varðveitast av Tjóðskjalasavninum.

At Tjóðskjalasavnið varðveitur persónupplýsingar merkir hinvegin ikki, at somu upplýsingar eru frítt atkomuligir, men einans tøkir, tá onkur hevur brúk fyri teimum og hevur nóg góða orsøk til at síggja upplýsingarnar. Henda spurning fara vit tó at taka í øðrum samanhangi.

# Nýggjar tíðir – NÝGGJAR BØKUR



**Jákup Reinert Hansen**
jakuprh@setur.fo
Ph.d., lektari í kirkjusøgu
Fróðskaparsetur Føroya

*Eru nakrar spennandi bøkur komnar út nýliga? Eru tær komnar til landið?*

Soleiðis kundu tey við góðari grund spyrja mitt í 18. øld. Eitt nýtt andaligt rák hevði tikið seg upp, hin sokallaða pietisman, og slíkt plagdi at síggjast aftur í teimum bókum, sum vóru at fáa – eisini í Føroyum. Í hesi grein fara vit at gera eina ferð aftur í 1700-talið at sóknast eftir góðum lesnaði á hillunum í handlinum og heima hjá fólki. Og keldurnar? Tær finna vit sjálvandi á Tjóðskjalasavninum.

**Føroyingar eru eitt lesandi** fólk. Tað sigur havnarpresturin Lucas Debes longu í 1673, og tað havi eg aðrastaðni staðfest við grundarlagi í protokollunum hjá skiftirættinum 1701-1728. Tað tykist, sum at lesing longu frá trúbótini var besti miðil, tá trúgv og læra skuldu prentast inn í fólkið.

Tann nýggja lutherska læran úr 16. øld sæst til dømis aftur í sálmabókini hjá Hans Thomissøn frá 1569, sum var vanlig í nógvum húsum, og í lestrabókini hjá Niels Hemmingsen frá 1576, sum enn í 1701-1728 var vanligasta lestrabók í føroyskum skiftum.

Tann ortodoksa læran, sum tók yvir tíðliga í 17. øld, og har tað fyrst og fremst galt um at hava rætta trúgv, gav seg til kennar i stórum tali í lestrabókini hjá Poul Andersen Medelby frá 1614. Tá ið longur leið út, og kenslulív og syndaiðran gjørdu vart við seg, fóru føroyingar at lesa úr lestrabókini hjá Jesper Brochmand frá 1630-unum og syngja úr sálmabókini hjá Thomas Kingo. Barnalærdómin fingu tey smáu inn við læribókini, tí lítlu katekismuni hjá Martin Luther.

Neyvan var tað fyrst og fremst prestsins prædika, men heldur heimaandakt og lestur í kirkjuni, sum gjørdi teir lesandi føroyingarnar til eitt gudrøkið fólk, væl kunnað um tað, sum rørdi seg á tí andaliga økinum í samtíðini.

## Kongaligi einahandilin sum bókahandil

Tær nýggju bøkurnar komu vanliga til landið saman við øðrum vørum við várthe fyrsta handilsskipi. Longu um heystið gjørdi handilsforvaltarin ein lista við teimum vørum, sum hann metti, at tørvur fór at vera á – ein sokallaðan *Provisions Notice*. Hann hevði t.d sín undirkeypmann at ráðføra seg við, og tá ið tað galt kirkjuligar vørur og bøkur, spurdi hann ▸



*Mynd av Havnini 1778. Vit síggja handilsskip liggja á redini, og vit síggja Kongliga Einahandilin á Tinganesi*

Erik Pontoppidan. Frágreiðing til Luthers katekismus


Sandhed
Til
Gudfrygtighed,
Udi
En eenfoldig og efter Muelighed kort,
dog tilstrekkelig
Forklaring
Over
Sal. Doct. Mort. Luthers
Liden Catechismo,
Indeholdende alt det, som den, der vil blive salig, har behov, at vide og giøre.
Paa
Kongel. allernaadigste Befalning.
Til almindelig Brug.
imprimatur.
C. L. LETH.
Selges her u-indbunden for 8. ß. Danske.
KJØBENHAVN,
Udi det Kongel. Wäysenhuses Bogtrykkerie,
og paa dets Forlag,
Trykt af Gottmann Friderich Kisel
Aar 1749.

seg fyri hjá prósti. Fyrisitingarkeypmaðurin í Keypmannahavn, sum hevði ábyrgd av handlinum upp á Føroyar, fekk hesar vørur til vega um veturin, og tá ið tær vóru innskipaðar, vórðu tær allar settar á ein nýggjan lista, kallaður *Specification* ella *Designation* við tali, stykkjaprísi og samlaðum virði. Í 1735 fingu Føroyar t.d. 12.000 oblatir (altarbreyð), ein silvurkalik og -disk til altargongd, sum tók 1½ pott, og einar ljósastakar úr messing.

Men nú fara vit til ta hillina, har bøkurnar standa. Vørulistarnir eru allir úr protokollunum hjá stiftsamtmanninum, og hesir listar byrja í tí lisna tilfarinum í 1735 og halda á líka til 1770. Tað pietistiska rákið, vit vænta at síggja aftur, valdast ikki minst Christian VI, ið gerst kongur í 1730, og teir kirkjuleiðarar, hann setir í starv.

*Ein* bók verður keypt á hvørjum ári, og hon varir heldur ikki meira enn eitt ár. Tað er álmanakkin, sum altíð kemur í góðari tíð. Longu á vári 1735 er álmanakkin fyri 1736 at fáa til keyps fyri tveir skillingar. 60 eru teir í tali, men longu í 1738 hækkar talið upp í 70 og verður verandi tað sama alt tíðarskeiðið.

Børnini skulu øll læra at lesa, og hóast tað er hugsandi, at ABC-in fer frá einum systkin til annað og kanska eisini verður lænt húsanna millum, eru næstan altíð nakrar við skipinum. Tær verða roknaðar í dusinum, ein tylvt kostar 32 skillingar. Oftast er tørvur á 24 bókum, men talið kann ganga niður í 12 og upp í 48 eintøk bæði í 1761 og 1762.

Børnini skulu eisini øll læra hin kristiliga barnalærdómin, og til tað endamálið er tørvur á Luthers lítlu katekismus (Catechismi Bøger, sum tær kallast). Katekisman kostar tað sama sum stavingarbókin ella ABC-in, og at kalla líka nógvar bøkur verða seldar av báðum sløgum. Tað er heldur ikki at undrast á, tí einki trúarfrælsi var. Eins og øll skuldu kenna bókstavirnar, skuldi hvørt mansbarn kenna trúarinnar grundvøll.

Vit kunnu ganga skjótt fram við hesum bókum, tí tær standa altíð á hillini. Hetta er sama vøru, sum altíð skal vera til taks. Men nú koma vit til tær bøkur, sum verða endurnýggjaðar, tá ið tíðirnar skifta, og kirkjutrúgv og kirkjusiðir leggja á annan bógv.

Tann fyrsta er uppaftur ein katekismus, og tað kann tykjast eitt sindur óneyðugt. Men lítla katekismus segði bara tað heilt grundleggjandi, og tí mátti eisini vera ein onnur bók fyri eldri og meira framkomin børn: ein katekismus-forklåring. Í 1735-41 reksa specifikatiónirnar upp tilsamans 84 eintøk av frágreiðingini hjá Mads Pedersen Rostock: *Dend eenfoldige Børne-Lærdoms usvigelige Melk for Eenfoldige Børne-Christne*.

Bókin varð útgivin í 1694 og prentað uppaftur 10 ferðir. Rostock var m.a. prestur við dómkirkjuna í Odense, har hann arbeiddi saman við Thomas Kingo, biskupi, og var skriftafaðir hansara.

Men í 1741 kemur ein nýggj katekismus-frágreiðing í handilin, sum er skrivað av Pontoppidan. Hetta hevur beinleiðis samband við, at kongur í 1736 við lóg setti konfirmatiónina í verk. Áðrenn børnini kundu verða konfirmerað, skuldu tey hava gingið til hjá presti, og kongur gav hovpresti sínum Erik Pontoppidan boð um at skriva eina hóskandi læribók. Hon varð útgivin í 1737 og fekk navnið *Sandhed til Gudfrygtighed*. 25. juni 1739 skrivar Hersleb, biskupur, til Føroya próst, Clemend Jensen Færøe, og sigur frá, at henda bókin nú eigur at verða nýtt heldur enn allar tær gomlu.

Hann greiðir eisini frá, at eingin skal noyðast at læra hana uttanat orðarætt, men at skilja innihaldið og læra seg at svara við egnum orðum. Og tá ið hann 25. juli 1741 sigur seg hava frætt, at tey fyrstu eintøkini eru komin til landið og býtt út til prestarnar, mælir hann til, at nøkur bløð kunna verða lisin í kirkjuni hvønn sunnudag eftir lestur. Tað var kanska líka frægt, at Pontoppidans-bókin ikki skuldi lærast uttanat, tí hóast tað stóð á fremstu síðu, at hon var „eenfoldig og efter Mueligheden kort, dog tilstrekkelig", vóru 759 spurningar og svar í henni. Bókin hjá Rostock kostaði 6 skillingar, og bókin hjá Pontoppidan 13 skillingar; men so var hon eisini innbundin.

Kanska gongur ein tíð, áðrenn konfirmatiónin verður heilt vanlig, tí byrjað verður varisliga við einum 12 eintøkum tey fyrstu árini, men so hækkar talið, og Pontoppidans frágreiðing gerst líka vanlig sum ABC og Luthers lítla katekismus. Tá ið hillarnar aftur eru tómar í 1770, eru tilsamans 650 eintøk seld í Føroyum!

Hvussu høgt hetta talið í veruleikanum er, síggja vit, um vit fara at telja tær autoriseraðu sálmabøkur ella Kingobøkur, sum verða seldar hetta sama tíðarskeiðið. Tí tær eru 444 í tali. Og aftur fáa tær góðu gomlu bøkurnar kapping frá nýggjum bókum, tí Christian VI, kongur, gav eisini presti sínum Pontoppidan boð um at leggja eina nýggja sálmabók til rættis. Tær fyrstu 24 koma í handilin í 1753, og so munnu tað altíð ganga nakrar, tí tá ið vit gera talið upp í 1770, eru vit komin upp í 120.

Sálmabókin hjá Pontoppidan hevði sínar kláru fyrimunir. Hon var sett við størri skrift og sostatt lættari at lesa. Hon var eisini størri í vavi við 259 nýggjum sálmum. Brorson, sum annars bara var kendur í Suðurjútlandi, átti 92 sálmar í bókini, t.d. *Hin vænasta rósan er funnin*. Millum teir sálmar, sum vóru umsettir úr týskum var *Nú takkið Guði øll*. Ja, Pontoppidan hevði enntá 9 sálmar hjá Kingo, sum ikki stóðu í tí sálmabók, ið var prýdd við hansara navni – *Nú rennur sólin fríð úr eysturlondum*, um vit skulu nevna bara ein teirra. Soleiðis gjørdi tann nýggja, pietistiska tíðin vart við seg við vøkrum og yndisligum sálmum.

Nú bera vit eyga við eina stóra og tunga bók. Hetta má næstan vera ein lestrabók, men ikki er tað Brochmand. Í 1736, 1739, 1753 og 1756 koma hvørja ferð 6 lestrabøkur við handilsskipinum, og høvundur er Henrich Müller. Müller var týskur prestur og livdi frá 1631-75, og lestrabók hansara varð týdd til danskt í 1711. Føroyingar gjørdust so hugtiknir av hesi bók, at teir lósu úr henni líka upp í 20. øld. Vit fáa hug at blaða eitt sindur í henni. Hvussu útleggur Müller t.d. Jesu orð úr fjallaprædikuni: „Hyggið at himmalsins fuglum; teir sáa ikki, ei heldur teir heysta og bera ei heldur saman í løður, og himmalski faðir tykkara føðir teir; eru tit ikki mikið meir verdir enn teir?" (Matt 6,26)

*Jesus vísir okkum ikki til teir fuglar, sum fólk hava sitandi í einum búri og geva at eta aftur fyri at teir syngja og láta so vakurt. Tað er, fyri at vit ikki skulu siga: Ja, hesin og hasin fuglur hevur ein harra, sum syrgir fyri honum, men hvør syrgir fyri mær?*

*Nei, Jesus vísir okkum til teir villu fuglar, sum flúgva undir himlinum. Og hvat síggja vit so hjá hesum fuglum? Ein fuglur er sorgleysur og hevur gott treysti, hann syngur, hann leypur, hann stúrir ikki fyri nøkrum. Høvdu vit spurt: „Góði fuglur, hví ert tú so glaður, hví syngur tú so fróur, hví leypur tú so lystiliga av eini grein á aðra, veitst tú tær nakað til føðslu?" Kundi fuglurin talað, hevði hann svarað: „O, menniskja, eg líti á mín góða Guð í allari mínari neyð. Guð hevur skapað meg, eg lati hann uppihalda meg og syrgja fyri mær. Í skaparverki sínum hevur hann sum í einari stórari løðu givið mær meira, enn eg klári at eta og fortera, hví skal eg stúra?*

Eftir hetta prát við smáfuglin fer Müller at samanbera og undirvísa sínum áhoyrarum.

Brochmand fer sjáldan út um Bíbliuna, tá ið hann skal taka eitt dømi. Í hesum føri um fuglarnar vísir hann í sínum lestri til ravnarnar í Gamla Testamenti. Men Müller leitar út í natúruna og dugir at taka til tað, sum er partur av gerandisdegnum hjá vanligum fólki. Tí er lestrabók hansara lættari at skilja, og tí ▸

**Prentaðar keldur**

Hansen, J.R.: Góður gamal kristindómur, Sprotin 2022.
Malling, A.: Dansk Salme Historie Bind VIII. Salmebøgerne. København 1978.
Müller, H.: Evangeliske Hierte-Speyl, som indeholder en Forklaring over alle Søndagenes og Festernes Evangelier, og ni af den Sal. Mands Prækener over Passionen eller Christi Lidelse. 22. upplag. Kiøbenhavn 1781.
Pontoppidan, E.: Den nye Psalme-Bog, udi hvilken findes ey allene de Psalmer, som udi den forordnede Kirke-Psalme-Bog af Doct. Kingo have været samlede, men endogsaa mange andre udvalte, deels nye, deels af det tydske Sprog oversatte Psalmer, til desto mere Opbyggelses Anledning. København 1740
Pontoppidan E.: Sandhed til Gudfrygtighed, udi en eenfoldig og efter Muelighed kort, dog tilstrekkelig Forklaring over Sal. Doct. Mort. Luthers Liden Catechismo. København 1749.
West, J.F.: The history of the Faroe Islands 1709-1816, Vol. 1, C. A. Reizel 1985.
Weyhe, J.H.: Nogle Vigtige Troens Articler/ I vort Danske Sprog, Forestillede udi Sytten Prædikkener/ Som paa Maaneds Bede-Dage kunde læses/ GUds allerhelligste Navn Til Ære/ Og Alle mennisker til Opbyggelse. København 1733.

**Handskrivaðar keldur á Tjóðskjalasavninum**

A-1021 Sorinskrivarin
Skiftiprotokollir 1734-41, 1741-47, 1747-61, 1761-1809
Føroya stiftsstjórn
Da- Indkomne Breve 1693-1804
A-1037 Stiftsamtmaðurin
Cb – Protokollir 1729-1816
Protokol for Færø nr. 5 – 1729 28. Mars – 1754 11. Juli
Protokol for Færø nr 6 – 1756 13. Februar – 1770 9. Februar

mundi próstur halda, at hetta var tann rætta bókin hjá føroyingum at lesa.

*Jesu hjartaspegil*, kallar Müller bók sína, og endamálið við hansara prædikum er, at tann, sum lesur ella hoyrir tær, skal spegla sítt hjarta í frelsarans hjarta. Ein fyrimun aftrat hevði Müllers bók. Har vóru føstulestrar yvir Jesu pínslusøgu, og teir funnust ikki hjá Brochmand. Tað skal so leggjast aftrat, at tá ið ein nýggj útgáva av lestrabókini hjá Luther sær dagsins ljós á donskum í 1746-48, verður hon tann næsta, sum verður at finna hjá tí, sum fer til handils í 1759.

Seinasti spurningur, áðrenn vit fara aftur úr kongliga einahandlinum – ella rættari sagt frá handilslistunum: Lósu føroyingar so eisini dúgliga í Bíbliuni? Nei, tað er lítið, sum bendir á tað. Teir føstu tekstirnar, epistlar og evangelium funnu tey í altarbókini, sum var aftast í sálmabókini. Og gleðiboðskapurin sjálvur búði sjálvandi undir øllum tí, tey lósu og terpaðu í læribókum, sungu í sálmabókum, hoyrdu, tá ið tey sótu í lestri. Men Bíbliur vóru ongar at fáa. Einans ferð, í 1756, komu 24 Nýggja Testamenti, og eftir øllum at døma var ikki tørvur á at fylla uppaftur á hillini, har tey komu at standa.

## Biðidagsbókin hjá Weyhe

So er kortini ein bók eftir, sum vit noyðast at vísa á, hóast hon ikki kom við handilsskipinum og sostatt neyvan fekst til keyps í krambúðini. Sum skiftiprotokollirnar bera vitnisburð um, áttu føroyingar nógvar aðrar bøkur enn tær, sum eru at finna á handilslistunum. Ilt er at vita, hvussu tey fingu hendur á teimum; men í hesum eina førinum kann tað vera høvundurin sjálvur, sum hevur selt sína bók um landið.

Hann eitur Johan Henrich Weyhe, er føddur í Sandavági í 1706, gerst prestur í Suðuroy 1733 og í Suðurstreymoy 1745-1770. Eftir at hava fingið prógv í gudfrøði í 1728, hevur hann tíð at granska og skriva, og helst fær hann bókina *Nogle vigtige Troens Articler* prentaða hjá Schmidtgen, tá ið hann kortini fer til Keypmannahavnar at verða prestvígdur í 1733. Hetta er ein sermerkt lítil lestrabók:

- Hon er beinleiðis skrivað til føroyingar, sum noyðast at lesa lestur, av tí at prestarnir hava so nógvar kirkjur at røkja, at teir eru sjáldan í hvørjari teirra.
- Hon hevur ikki lestrar til vanligar sunnu- og halgidagar, men til teir nógvu biðidagar, sum um hetta mundið verða hildnir í Føroyum: hvønn mikumorgun eftir nýmána ella tendring og tríggjar biðidagar um várið og tríggjar um heystið. Onkur av hesum døgum fellur sjálvandi í føstu, tá ið føstulestur er á skránni, og tí heldur Weyhe 17 lestrar verða nóg mikið.
- Hon er skrivað sum ein praktisk trúarlæra við hesum evnum: Tað óseka menniskjað, sum var skapað í Guðs mynd; syndin; Kristus, frelsari hjá øllum; sonn umvending; trúarinnar fruktir og góðar gerðir; himmiríki og helviti.

Johan Henrich Weyhe skuldi nokk havt ráð at givið hesa bók út. Abbi hansara, sum hann æt eftir, var løgmaður, og pápi hansara Sámal Petersen, sum giftist við løgmansdóttrini Armgarð Weyhe, var somuleiðis løgmaður. Skiftiprotokollirnar kunnu geva okkum eina hóming av, hvussu skjótt henda bók spreiddist út um landið, tí millum 1736 og 1768 verður hon nevnd í hesum støðum: í Gásadali, í Kaldbak, á Selatrað, í Sørvági, í Stóru Dímun, í Svínoy, suðuri í Vági, í Syðrugøtu, í Leirvík, á Sandi, í Hvalba, í Havn og á Glyvrum. Umframt hesar 13 bøkur eru aðrar 13, sum bara verða kallaðar „ein biðidagsbók" og kunnu vera sama bók. Kirkjuroknskapirnir vísa, at eisini kirkjurnar ognaðu sær bókina hjá Weyhe, t.d. er hon útreiðsluførd millum 1734 og 1749 í hesum kirkjum í Eysturoy: á Nesi, á Eiði, við Sjógv, í Oyndarfirði og í Funningi.

Weyhebok er eitt samtíðarverk, eitt týðiligt tekin um sína tíð og tey rák, sum fylla hana, helst bæði pietismu og upplýsingartíð. Tað dámdi pietistunum at sleppa frá at fylgja kirkjuárinum og heldur skipa bøkur sínar eftir trúarlívinum, sum Weyhe ger í hesum føri. Tað eyðkennir eisini pietismuna, at hon heldur, vit øll uttan mun til lærdóm ella arbeiði kunnu og eiga at lesa í Bíbliuni og tala um hana. Weyhe gevur í 12. kapitli „Um umvending" hesi ráð: „Tit skulu vera saman við øðrum trúgvandi Guðs børnum og tingast og tala dúgliga við tey um Guðs orð og gudiligar lutir. Verið vís í, at eins og eitt jarn hvessir annað, og eitt ljós festir í annað, so kann eitt Guðs barn við gudiligari samrøðu upplýsa, uppbyggja, styrkja og bøta annað í trúnni."

Og tað eyðkennir upplýsingartíðina, at hon hevur ilt við at góðtaka annað sum satt enn tað, ið kann staðfastast við at granska natúruna ella Guðs orð. Tí ávarar Weyhe í sama kapitli álvarsamt um alla ta følsku



pátrúgv, sum ger nógvum føroyingum so ilt: „Trúgvin hjá nógvum fólkum er einki annað enn pátrúgv. Summi lesa eitt ella annað ørindi og taka haraftrat stundum Guðs ella Jesu navn í fáfongd fyri at reka burtur sjúku ella aðra óeydnu.

Summi halda ávísar dagar verða óeydnisdagar til hetta ella hatta arbeiði, og summi líta á dreymar og spádómar. Serliga er tað ein púra vanlig pátrúgv djúpt í mannahjørtum, at til er eitt serligt slag av undirjørðiskum fólkum ella menniskjum, sum búgva í klettum ella heyggjum. Hetta er jú púra órímiligt og hevur hvørki grundarlag í natúruni ella í Guðs opinberaða orði, men byggir á møsn og leyst uppáhald hjá forførandi fólkum, sum tey einføldu og góðvarnu tó taka fyri fult."

## Tann nýggja tíðin

Sagt verður um ta pietistisku trúnna, at hon vildi flyta trúnna úr høvdinum niður í hjartað og út í hendurnar. Meira enn at hava rætta trúgv galt tað um, at trúgvin gjørdist persónlig og sýndi seg í verki og næstakærleika. Hetta rákið, sum úr Týsklandi breiddi seg til Norðurlond, rakk eisini til Føroya við teimum bókum, sum her vóru seldar og lisnar, við tí sera høga tali av læribókum til konfirmatiónsfyrireiking, sum handilin seldi, og við eini nýggjari sálmabók.

Erik Pontoppidan var maðurin, sum legði bæði hesi verkini til rættis eftir boðum frá kongi. Við lestrabókini hjá Müller fingu føroyingar inniligar og yndisligar prædikur við vøkrum myndum frá gerandisdegnum. Og í bókini hjá Weyhe vóru tey ávarað móti pátrúgv: Huldufólk eru als ikki til!

Tað hevði Lucas Debes aldri kunnað sagt í síni Føroyabók 70 ár undan Weyhe. Hann ræddist sum kunnugt spøkilsi.

# TÍ SKULU VIT LANGTÍÐAR-VARÐVEITA HAGTALS- OG GRANSKINGAR-DÁTUR



**Rói Eliasen**
roie@skjalasavn.fo
Kt-skjalavørður
cand.mag.
Tjóðskjalasavnið

*Dátugrunnurin 'Manntal 2011' verður gull verdur um 100 ár. Nærum allir føroyingar tóku lut í hesi umfatandi samfelagsligu støðumynd. Møguleikarnir at troyta í hesi kanning eru nærum óendaligir. Avbjóðingin higartil hevur verið at finna eitt format at langtíðarvarðveita skipanina í, so at hon kann endurnýtast sum granskingarkelda framyvir. Henda avbjóðing er nú loyst.*

**Í frágreiðing til løgtingið** í 2010 verður víst til 'Manntal 2011', sum tá var í umbúna. Eitt av endamálunum við kanningini var at framleiða grundtilfar til gransking. Grunnurin skuldi vísa eina 'løtumynd av samfelagnum'. Í hesum sambandi verður sagt, at: *„Kanska fer onkur um 100 ár at undra seg (...)"*. Tey væntaðu sostatt, at teljingin ikki bara fór at koma samtíðini til gagns, men eisini fór at vekja áhuga millum fólk heili 100 ár aftaná.

Spurningurin er, hvussu tey sóu fyri sær, at fólk um 100 ár fóru at brúka kanningina. Í 2010 var ikki gjørligt at varðveita talgilt, so møguliga hugsaðu tey, at Manntal (einans) skuldi varðveitast í pappírsformi. Hetta hevði helst ikki verið nakar trupulleiki í sjálvum sær, tí pappír hevur langa livitíð, um umstøðurnar eru nøktandi. Hinvegin er trupult at gagnnýta slíkt hagfrøðiligt tilfar, um tað bara finst í pappírsformi.

Umleið 12 ár seinni, hin 5. mai 2022, varð ein talgild skjalasavnsútgáva av dátugrunninum 'Manntal 11.11.2011' avhendað Tjóðskjalasavninum til langtíðarvarðveiting. Hetta er fyrsta avhending í Føroyum, har ein hagtalsgrunnur er formbroyttur til langtíðarvarðveiting við forritinum 'ASTA-Extended'. Forritið er ment til at framleiða skjalasavnsútgávur av dátugrunnum uttan skjøl. Við at formbroyta hesar dátugrunnar til skjalasavnsútgávur ber til at langtíðarvarðveita teir. Sostatt er Manntal 2011 komið í eina skipan, har vit kunnu vænta, at dátugrunnurin heldur í nógv ár fram í tíðina, so at fólk til dømis ikki einans undra seg um 100 ár, men eisini kunnu brúka talgildu upplýsingarnar úr dátugrunninum á ein skipaðan og effektivan hátt.

### Bakgrund og avbjóðing

Ongantíð áður hava so nógvar talgildar dátur verið framleiddar, og samstundis eru ongantíð áður so ▸

## UM MANNTAL 2011

„Eitt manntal lýsir eitt ávíst tíðarskeið í søguni fyri okkara eftirkomarar. (...) Í gomlum fólkateljingum síggja vit, hvussu nógvar arbeiðskonur vóru í teimum ymsu húskjunum. Kanska fer onkur um 100 ár at undra seg yvir, hvar arbeiðskonurnar blivu av – ella kanska eru tær enn onkrastaðni"

*(Frágreiðing til Løgtingið 2010)*



## SKJALASAVNSÚTGÁVA

Ein skjalasavnsútgáva er tann úrdráttur/kopi, sum verður tikin úr eini kt-skipan til at avhenda á Tjóðskjalasavninum.Skjalasavnsútgávan skal vera óheft av tí skipan, sum dáturnar vóru skaptar í, og skal innihalda: dátuinnihald, dátuskipan og skjalfesting

nógvar dátur mistar burtur. Talgildar dátur eru nógv forgeingiligari enn analogt tilfar. Neyðugt er tí at seta í verk serlig tiltøk, sum hava til endamáls at varðveita talgilt tilfar. Tá tosað verður um varðveiting, so verður her hugsað um langtíðarvarðveiting, tvs. í minsta lagi 100+ ár.

Tjóðskjalasavnið hevur í nógv ár virkað fyri at fáa gongd í talgilda langtíðarvarðveiting í Føroyum. Ein ætlan við strategivali og framferðarhátti var klár í fleiri ár, men verulig gongd kom ikki á arbeiðið fyrr enn í 2016, tá serlig játtan varð sett av til hetta, og fyrsti kt-skjalavørðurin varð settur í starv. Politiski viljin var tá, at tað mesta av varðveitingararbeiðinum skuldi gerast av danska Ríkisskjalasavninum við danskari infraskipan og danskari serfrøði. Kt-skjalavørðurin á Tjóðskjalasavninum skuldi vegleiða føroysku myndugleikarnar og saman við starvsfelaga fáa sær innlit í vavi av kt-skipanum í almenna geiranum. Hann skuldi somuleiðis gera ætlanir fyri at avhenda og samskipa avhendingarnar úr Føroyum til Danmarkar. Restin, tvs. góðskutesting, góðkenning og varðveiting, og møguliga eisini atgeingi, skuldi ganga fyri seg á Ríkisskjalasavninum í Danmark.

### Skyldan at varðveita

Áðrenn verulig gongd kom á sjálva varðveitingina í Danmark, skifti politiski viljin eftir trýsti frá meirilutanum í samgonguni. Við broyting í lógini um skjalasøvn (2018), varð Tjóðskjalasavnið álagt at varðveita í Føroyum. Árið eftir fylgdi fígging við til at fremja hetta kravið, og ein kt-skjalavørður varð settur afturat, m.a. til at menna kt-verkstaðin. Í 2020 varð ein testverkstaður staðsettur á Tjóðskjalasavninum, og í hesum sambandi byrjaði tann triði kt-skjalavørðurin at arbeiða við góðskutesting og góðkenning. Síðani tá hevur Tjóðskjalasavnið sjálvt røkt allar uppgávur, tó við nakað av ráðgeving frá danska Ríkisskjalasavninum, sum hevur ment tann framferðarhátt, kallaður 'migrering', sum Tjóðskjalasavnið brúkar sum grundarlag fyri talgilda varðveiting.

Allar kt-skrásetingarskipanir hjá almennum myndugleikum skulu fráboðast Tjóðskjalasavninum, ið góðkennir tær og ger av, um tær skulu varðveitast. Umleið fimta hvørt ár skulu myndugleikarnir so avhenda umrøddu skipanir sambært ásetingum Tjóðskjalasavnsins. Tjóðskjalasavnið er einasti myndugleiki, sum hevur loyvi at áleggja øðrum

## HVÍ LANGTÍÐARVARÐVEITA KT-SKIPANIR?

Um Føroyar gera ov lítið við at langtíðarvarðveita talgildar kt-skipanir, herundir granskingardátur og hagtalsgrunnar, er vandi fyri at komandi ættarlið vita minni um okkara tíð, enn vit vita um seinastu øld

myndugleikum at avhenda, og sum hevur førleikar og infrakervi til at varðveita talgilt tilfar, serliga dátugrunnar við skjølum/fílum ella uttan skjøl/fílir. Eisini er Tjóðskjalasavnið einasti myndugleiki í Føroyum, sum hevur loyvi til at liggja inni við persónupplýsingum, uttan at hava nakað endamál við teimum, annað enn til at varðveita.

Í dag er verulig ferð komin á talgilda varðveiting. Nærum 30 skjalasavnsútgávur eru avhendaðar. Harvið hevur Tjóðskjalasavnið umleið 3 TB av talgildum dátum í langtíðarvarðveitslu, og um alt gongur eftir ætlan, kemur samlaða goymslan uppá eini 5-6 TB við ársenda 2022.

### Bíða eftir yvirskipaðari ætlan

Tær flestu av teimum omanfyrinevndu kt-skipanum, sum eru á goymslum Tjóðskjalasavnsins, eru sokallaðar fyrisitingarligar TMSH-skipanir (Talgildar Máls- og SkjalaHandfaringarskipanir), men eisini ▸

## FYRIMUNIR VIÐ AT LANGTÍÐARVARÐVEITA GRANSKINGARDÁTUR OG HAGTALSGRUNNAR!

- Dátur tryggjaðar móti tøkniligum elli
- Freistir um striking, sbrt. dátuverndarlógini, verða hildnar
- Dátur kunnu endurnýtast í framhaldandi viðgerð ella í nýggjari gransking (smbrt. skjalasavns- og dátuverndarlóg)



**TMSH**

orðið 'TMSH-skipan' er stytting fyri 'Talgild-, Máls- og SkjalaHandfaringarskipan'. Hetta er ein fyrisitingarlig skrásetingarskipan, har bæði journalir og journalmál eru talgild



eru nakrar fáar fakskipanir og onkur hagtalsgrunnar avhendað. Kanningar, sum Tjóðskjalasavnið hevur gjørt, vísa tó, at fleiri grunnar við granskingardáta og nógvir hagtalsgrunnar eru kring landið, men enn er eingin yvirskipað ætlan gjørd, ið hevur til endamáls at samskipa ella fremja eina langtíðarvarðveiting av júst hesum tilfari.

At granskingarmyndugleikarnir sjálvir ikki hava fokus á langtíðarvarðveiting, er kanska ikki so løgið, tí flest øll, eisini granskingarstovnar og granskarar, hugsa vanliga ikki langtíðarvarðveiting inn í sín gerandisdag. Hinvegin so er langtíðarvarðveiting júst tað, sum er uppgávan hjá Tjóðskjalasavninum.

Av tí at mongdin av granskingardáta og hagtalsdáta veksur so skjótt, og nærum alt hetta tilfar er talgilt, veksur eisini vandin fyri at tilfarið fer fyri skeytið. Tí er neyðugt frá byrjan at seta eyka fokus á langtíðarvarðveiting fyri slíkt tilfar. Og av tí at fleiri og fleiri framleiða granskingardátur og hagtalsdátugrunnar, er eisini neyðugt at ein felags ætlan verður gjørd, og at skipað verður fyri felags átøkum, soleiðis at spurningurin um varðveiting gerst enn sjónligari hjá enn fleiri.

## Granskingardátur og hagtalsgrunnar

Sum sagt, so finst 'Manntal 2011' sum varðveittur hagtalsgrunnur á Tjóðskjalasavninum. Aðrar skipanir finnast eisini, t.d. veiðuloyvi og veiðudagbøkur frá Vørn, men tað finst ikki so nógv av slíkum tilfari í talgildum formi á Tjóðskjalasavninum. Flestu dátugrunnarnir eru spjaddir kring landið. Kanningarnar hjá Tjóðskjalasavninum vísa, at annað áhugavert tilfar eisini finst, sum møguliga átti at verðið avhent. Dømi um hetta eru: 'geo-data' frá Jarðfeingi, 'Bastaskipanin' hjá Havstovuni og 'Krabbameins-dátugrunnurin' á Landssjúkrahúsinum.

So hvørt sum tilfar av hesum slagi verður avhent til Tjóðskjalasavnið, verður tað skrásett í goymsluskránni hjá Tjóðskjalasavninum. Tí fer eisini at bera til hjá granskarum og granskingarstovnum at fáa innlit í og yvirlit yvir, hvørjir dátugrunnar finnast í Føroyum. Harvið skapast eisini betri møguleikar fyri at samstarva og brúka tilfar úr øðrum grunnum enn bara eins egna.

So hvørt sum dátugrunnarnir verða varðveittir, og góðskan gerst betri, fara hesir fyrimunir at verða enn sjónligari, bæði fyri granskingarumhvørvið og fyri samfelagið sum heild.

## Hvussu fremja í verki?

Tjóðskjalasavnið hevur sum nevnt ætlanir um at savna inn granskingar- og hagtalsdátur frá so nógvum sum gjørligt. Fyrst og fremst frá myndugleikum og stovnum, sum jú hava skyldu at avhenda til Tjóðskjalasavnið, men eisini frá felagsskapum og persónum, sum hava savnað inn granskingardáta og hagtøl. Sum útgangsstøði eru øll fakøki og øll sløg av dáta áhugaverd, óansæð um talan er um kvantitativt ella kvalitativt dáta. Endamálið er at langtíðarvarðveita tilfarið, við tí í hyggju at hava umsjón við rættinum og tørvinum á upplýsing og gransking, og fyri at stimbra samfelagsmenningina í vitanarsamfelagnum og fyri at stuðla rættartrygdini, eitt nú fyri at varðveita grunddáta.

Í fyrstu atløgu er neyðugt at fáa eitt so fullfíggja yvirlit yvir verandi dátugrunnar sum gjørligt við at lýsa bæði innihald, form og tøkni. Hetta kann gerast í samband við fráboðanir til Tjóðskjalasavnið. Eisini kann tað gerast í sambandi við at innsavna dáta, t.d. við survey-kanningum.

Í aðru atløgu er neyðugt at skapa semju um krøv til góðsku og standard. Hetta kann gerast við at Tjóðskjalasavnið vegleiðir um góðsku, ella við at øll í felag taka støði í sokallaðu FAIR-meginreglunum. Eisini er samskifti millum Tjóðskjalasavnið, myndugleikar og granskarar av stórum týdningi. Tjóðskjalasavnið hevur tí verið runt og vitjað fleiri granskingarstovnar og granskarar og greitt teimum frá hesi tilgongd, og um týdningin av at varðveita.

Í triðju atløgu er neyðugt at fáa gongd á avhending av dátugrunnum til Tjóðskjalasavnið. Hetta krevur gott samstarv og samskifti millum Tjóðskjalasavnið og tey, sum skulu avhenda. Eisini er tað ein fyrimunur, um tey, sum skulu avhenda, læra seg at vera við til at framleiða eina skjalasavnsútgávu. Til hetta skal forritið, ið varð brúkt til at framleiða eina skjalasavnsútgávu av Manntal 2011, brúkast. Fleiri fólk innan granskingarumhvørvið, og eisini fleiri kt-veitarar, hava longu fingið tilboð um webinar-skeið í júst hesum forritið. Til ber eisini at skipa fyri nýggjum skeiðum hesum viðvíkjandi.

**Yvirlit yvir ymiskar kt-skipanir og avtalur, ið Tjóðskjalasavnið (TSS) hevur gjørt**

| Skipanir | Status oktober 2022 |
|---|---|
| TMSH-skipanir/kt-journalskipanir | 125 skipanir – ið eru virknar – eru fráboðaðar og skrásettar. 21 eru langtíðarvarðveittar á TSS. 26 eru í ella ávegis í framleiðslu til avhendingar. |
| Fakskipanir | Bert ein lítil partur er fráboðaður eftir reglunum. Tørva fráboðan av heilsuskipanum, kommunalum skipanum og øðrum fakskipanum. Tríggjar skipanir er langtíðarvarðveittar. Tvær eru ávegis í framleiðslu til avhendingar. |
| Grunddátu-skipanir/Grundskráir | Avtala er gjørd við Umhvørvisstovuna um framleiðslu og varðveiting av grunddátuskipanum. US røkir uppgávur viðv. grunddátum í Føroyum. |
| Granskingarskipanir | Kunningarátøk, fyrilestrar og annað samskifti er framt. Reglur, vegleiðingar og onnur kunning er gjørd og er atkomulig á heimasíðu hjá Tjóðskjalasavninum. Skráseting skal fremjast av granskingarmyndugleikunum, so støða kann takast til, hvat kann ella skal langtíðarvarðveitast. |

**FAIR**

meginreglur, sum siga hvussu dátur kunnu styrkjast og ríkast við metadátum. Orðið FAIR stendur fyri: Findable, Accessible, Interoperable, Reusable

## Keldur


Amorim, R.C., Castro, J.A., Rocha da Silva, J. et al.: A comparison of research data management platforms: architecture, flexible metadata and interoperability, Universal Access in the Information Society, 16(4): 851-862, 2017. https://doi.org/10.1007/s10209-016-0475-y

Benefits Summary for a Data Archive. Charles Beagrie Ltd and CESSDA 2017. Retrieved from http://dx.doi.org/10.18448/16.0010

FAIRytale – https://zenodo.org/record/2248200#.XOUAclem2Ul – A book that explains the FAIR data principles with both a fictitious story and a easy understandable explanation of each principle.

Go FAIR, https://www.go-fair.org/ – a bottom-up, stakeholder-driven and self-governed initiative that aims to implement the FAIR data principles.

Layne, R., Capel, A., Cook, N., & Wheatley, M. (2012) Long term preservation of scientific data: Lessons from jet and other domains, Fusion Engineering and Design, 87(12), pp. 2209 – 2212. https://doi.org/10.1016/j.fusengdes.2012.07.004

Løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um skjalasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 30. apríl 2018 https://logir.fo/Logtingslog/49-fra-28-04-1992-um-Foroya-Landsskjalasavn--om-Faeroernes-Landsarkiv

Martone, M. E., Garcia-Castro, A., & VandenBos, G. R. (2018). Data sharing in psychology. American Psychologist, 73(2), 111–125. https://doi.org/10.1037/amp0000242

Zavalina, O.L. & Zavalin, V. (2018), Evaluation of Metadata Change in Authority Data over Time: An Effect of a Standard Evolution, paper, ASIS&T Annual Meeting https://doi.org/10.1002/pra2.2018.14505501064

Navale, V. & McAuliffe, M. (2018), Long-term preservation of biomedical research data [version 1; peer review: 4 approved, 1 approved with reservations], F1000Research, 7:1353. https://doi.org/10.12688/f1000research.16015.1

Research Data Alliance (RDA) – Global alliance https://www.rd-alliance.org

# FELAGS EYÐKENNI FYRI EYGNASJÚKUR, MULTIPPEL SKLEROSU OG PARKINSON

Ílegukanningar hava staðfest, at føroyska fólkið er at rokna sum eitt arvafrøðiliga avbyrgt fólk. Føroyar hava nærum verið avbyrgdar frá umheiminum í øldir, og tí eru vit, sum búgva her, ein homogenur bólkur við einstáttaðum arvaeginleikum.[1] Hetta ger føroysku ílegurnar til eitt serstakliga væl egnað granskingarøki hjá granskarum, sum vilja kanna arvaligar sjúkur, og hvussu tær kunnu verða staðfestar, fyribyrgdar og viðgjørdar. Vit hava góða skráseting av ætt og sjúku, og tað ger, at Føroyar eru í serstøðu innan ílegugransking.

Nakrar av teimum sjúkum, sum eru kannaðar av granskarum seinastu árini, eru gjørdar við grundarlagi í Ættarbandsskránni. Ávísar arvaligar sjúkur eru vanligari í Føroyum enn aðra staðni. Hetta kemst av fjarskotnu støðuni og av tí, at flestu føroyingar stava frá lutfalsliga fáum niðursetufólkum. Men nógvar arvaligar sjúkur eru als ikki til í Føroyum.



**Guðrið Andorsdóttir**
gudrid@biobank.fo
cand. scient
stjóri á Ílegusavninum

Ílegugransking ger, at betri vitan kann fáast um sjúkur. Tað kann menna betri sjúkustaðfestingarhættir og viðgerðir – bæði um sjúkur, sum eru serliga títtar í Føroyum, og sjúkur, sum eru vanligar í flestu londum og kanska hava stóran fíggjarligan týdning, men sum kunnu hava nakrar serføroyskar variantar.

Ílegusavnið samskipar tríggjar ymiskar skráir: eina ættarbandsskrá, eina diagnosuskrá og eina vevnaðarskrá. Við at samanbera upplýsingarnar í hesum skráum ber til at finna sambandið millum arv, umhvørvi og sjúku.

Tjóðskjalasavnið hevur vegna Ílegusavnið gjørt Ættarbandsskránna. Heimildin at gera Ættarbandsskránna er í Lóg nr. 62/2005 Løgtingslóg um gransking í mannaílegum, sum varð broytt við kunngerð nr. 12 frá 31. mars 2008 (Ílegulógin). Avmarkingar eru í nýtsluni av Ættarbandsskránni. Skráin kann bert nýtast til ílegugransking sambært Ílegulógini.

## Lutfalsliga stórt grundarlag

Roknað verður við, at síðan 1650 hava eini 180.000 fólk livað í Føroyum. Hesi fólk eru rættiliga væl skrásett í kirkjubókum, fólkateljingum og í øðrum almennum skjølum. Síðan 2007 hevur Tjóðskjalasavnið (tá Landsskjalasavnið) saman við Ílegusavninum arbeitt við eini Ættarbandsskrá (aðrastaðni nevnt multi generations register), har allar hesar


Fødte. Qvindekjøn.

No. | Aar og Datum. | Barnets fulde Navn. | Daabens Datum enten i Kirken eller Hjemme. | Forældrenes Navn, Stand, Haandtering og Opholdssted. | Faddernes Navn, Stand og Opholdssted. | Anmærkninger.

Mynd 1.




| BrugerID | Fuldt navn | Kø | Født dato | Fødested | Dødsdato | Dødssted | RIN |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 17600829000 | HØGNEDATTER, Anna | K | 1760 | Oyndarfirði | 29-9-1834 | Oyndarfirði | 851548 |
| 17600909000 | ZACHARIASEN, Anthonius | M | 9-9-1760 | Nes | 14-4-1843 | Tórshavn | 062828 |
| 17600914000 | HANSEN, Lucas | M | 14-9-1760 | Selatrað | | | 818850 |
| 17600914000 | WANG, Lucas Hansen | M | 14-9-1760 | Selatrað | | | 904684 |
| 17600916000 | TRAP, Talke Christine | K | 16-9-1760 | | 16-8-1832 | Danmark | 056178 |
| 17600918000 | HANSEN, Hans | M | 18-9-1760 | Skelby, Præstø | 24-1-1815 | Benløse | 015797 |
| 17600921000 | OLEDATTER, Christine | K | 21-9-1760 | Tórshavn | 16-11-1760 | Tórshavn | 062061 |
| 17600923000 | TORSTEINSSON, Thordur | M | 23-9-1760 | Sugandafirdi, Island | 4-7-1846 | Vági | 700038 |
| 17600924000 | PALUDAN, Anna | K | 24-9-1760 | Kalundborg | 2-5-1827 | Keypmannahavn | 045806 |
| 17600927000 | OLEDATTER, Maren | K | 27-9-1760 | Tórshavn | 11-8-1824 | Tórshavn | 062830 |
| 17601011000 | OLESEN, Magnus | M | 11-10-1760 | Hovi | 9-6-1832 | Hovi | 903423 |
| 17601030000 | JACOBSDATTER, Cathrine | K | 30-10-1760 | Eiði | | | 069455 |
| 17601102000 | JOHANNESEN, Søren | M | 2-11-1760 | Á Heyggi, Hvalba | 17-8-1824 | Hvalba | 938073 |
| 17601104000 | JOEN-VILLUMSEN, Thomas | M | 4-11-1760 | Vági | 19-10-1844 | Vági | 718631 |
| 17601117000 | SIMONSDATTER, Elsebeth | K | 17-11-1760 | Strondum | | | 067998 |
| 17601125000 | LILLIENSCHIOLD, Anna Christine | K | 25-11-1760 | Keypmannahavn, Danmark | | | 035894 |
| 17601127000 | COLDEVIN, Maren Friderica | K | 27-11-1760 | Noregi | | | 006695 |
| 17601128000 | RASMUSSEN, Clement | M | 28-11-1760 | Sandur | 2-1-1844 | Kirkjubø | 932226 |
| 17601201000 | ARCHTANDER, Thomas Mainwaring Arthur | M | 1-12-1760 | | | | 000031 |
| 17601205000 | JOENSEN, Joen | M | 5-12-1760 | Vági | 26-1-1825 | Vági | 705210 |
| 17601205000 | HANSEN, Jens | M | 5-12-1760 | Sandur | 16-3-1799 | Burturgingin Við | 759907 |
| 17601217000 | PETERSDATTER, Birgithe | K | 17-12-1760 | Glyvrar | 4-6-1859 | Kaldbak | 722533 |

Mynd 2.

ættarbandsupplýsingar um føroyingar eru skrásettar. Líknandi skráir eru í Íslandi, Svøríki, Noregi, Finlandi, Danmark og Taiwan.

Við Ættarbandsskránni bar til byggja upp ein fullfíggjaðan grunn við neyvum upplýsingum at gagna heilsu- og ílegugranskingini. *Sí mynd 1 og 2*

Kirkjubøkurnar eru tøppaðar inn í eina skipan, sum gevur okkum fyrimunirnar við elektroniskari atgongd og yvirliti. Tað inntøppaða tilfarið kann síðani umvegis algoritmur setast inn í eina ílegugranskingarskrá, og á tann hátt fæst eitt ættartræ knýtt at tí sjúkuni, sum verður kannað. *Sí mynd 3*

Nú eru møguleikar skaptir at granska uppá tvørs av ættarliðum og finna sambond í arvaligum viðurskiftum, sum kunnu hava týdning fyri sjúkur og viðgerð av sjúkum.

Ættarbandsskráin er sett saman av ymiskum keldum: *Sí mynd 4*

- kirkjubókum,
- fólkateljingum,
- landsfólkayvirliti,
- ættartalvum
- ættargranskarum.
- harafturat eru skifti og jarðarbøkur brúkt

Hetta tilfarið er tilsamans grundarlag fyri einari ættarbandsskrá, sum vit hava álit á. ▸

*Mynd 3.*






*Mynd 4.*

Ættarbandsskráin ger tað møguligt at gera ættartrø knýtt at ymiskum sjúkum. *Sí mynd 3.*

Tílík ættartrø geva góða kunning, um sjúkur eru sera arvaligar ella mestsum ikki arvaligar.

## Fara aftur til 1800

Sjálv Ættarbandsskráin fer øgiliga langt aftur í tíð, men til verkætlanirnar í íleguganskingini fara vit vanliga sjey ættarlið aftur, til umleið 1800. Tá ber til at fáa dátur bæði frá fólkateljingini í 1801 og frá kirkjubókunum í Ættarbandsskránni, og tá ið dátur frá tveimum ymiskum keldum eru skrásett, ger tað, at virðið á skrásetingini verður hægri, og hon verður tí tryggari at brúka. Tað er við til at gera Ílegusavnið til ein áhugaverdan samstarvspartnara hjá granskarum frá universitetssjúkrahúsum, universitetum og øðrum.

Eftir at deyðsattestir hjá føroyingum, deyðir frá 1879 til 1944, eru lagdar alment út á heimasíðuni hjá danska Ríkisarkivinum[2], hevur verið arbeitt við at tøppa tær dáturnar inn fyri at gera ættarbandsskránna uppafturmeira fullfíggjaða. Við hesum tilfarinum fæst ein triðja kelda til m.a. føðidato. Vit síggja longu nú, at tað eru nøkur, sum ikki eru skrásett í Ættarbandsskránni. Í deyðsattestunum eru føðidato, deyðsdato og deyðsorsøk. *Sí mynd 5*

## Tvíburaskrá

Ættarbandsskráin gevur møguleika fyri at gera eina tvíburaskrá, tvs. eitt yvirlit yvir allar tvíburar, føddir í Føroyum síðani 1700. Skráin er bert ætlað til íleguransking.

Í tvíburaskránni eru upplýsingar um 1546 tvíburapør fødd í Føroyum síðani 1700. *Sí mynd 6*

Tvíburaskráin er partur av Ættarbandsskránni, sum Tjóðskjalasavnið ger vegna Ílegusavnið. Í tvíburaskránni eru upplýsingar um føðidato og møgulig deyðsdato, og um tvíburarnir eru sama kyn ella tvey kyn.

Uml. 900 tvíburapør eru á lívi.

Enn eru ongar aðrar upplýsingar í tvíburaskránni. Í øðrum londum er tilfar um heilsu og deyðsorsøkir í tvíburaskráum, og ofta verða spurnarkanningar eins og klinisk interwiev gjørd av teimum tvíburum, sum vilja tað.

## Persónlagaður heilivágur

Ættarbandsskráin er eitt týdningarmikið amboð í arbeiðinum við persónlagaðum medisini, sum er eitt av nýggjastu økjunum innan sjúkuviðgerð. Álitið „Persónlagað medisin í Føroyum Ætlan fyri 2019 til 2024 © Heilsu- og innlendismálaráðið 2019"[3] lýsir persónlagað medisin soleiðis:

> *Persónlagað medisin fevnir um eina menning í heilsuverkinum, har millum annað fyribyrging og viðgerð í størri mun verður tillagað lívfrøði (biologi) og lívvirkisfrøðini (fysiologi) hjá tí einstaka. Hetta út frá teirri sannføring, at ein greining av genominum kann hjálpa at skilja, hví sjúklingurin er sjúkur, og harvið, hvussu sjúklingurin verður viðgjørdur á besta hátt. Við at taka eina genomroynd av sjúklinginum og síðani at greina genomið, ber til meira neygreiniliga at staðfesta, hvør viðgerð og hvør heili-vágur er best egnaður til júst henda sjúklingin. Eisini er møguligt at staðfesta, hvør viðgerð ella heilivágur ikki virkar upp á ein ávísan sjúkling. Soleiðis kunnu læknar betur málrætta viðgerðina til tann einstaka sjúklingin. Høvuðsendamálið er, at sjúkuavgerðir og greining av sjúkum verður betri, soleiðis at viðgerðin kann tillagast tann einstaka sjúklingin. Hetta er við til at økja um virknaðin av viðgerðini, samstundis sum minkað verður um hjáárin.*

Ættarbandsskráin varð gjørd tøk á Vanganum í 2020 sum partur av skipanina Talgildu Føroyar.

Hetta hevur verið sera vælumtókt, og sambært Vanganum er Ættarbandsskráin mest vitjaða síða á Vanganum.

Ein fyrimunur er, at vit hava fingið ein rættlestur, har brúkarin hevur gjørt vart við inntøppingarvillur, um brúkarin hevur funnið tær. Endamálið hjá Ílegusavninum at vera við á Vanganum var bæði at geva fólki atgongd til egnar dátur og fáa allar føroyingar at koma við rættingum. So úrslitið er ein uppafturbetri Ættarbandsskrá.

## Upplýsingar um øll í familjuni

Í Ættarbandsskránni er fyri hvønn einstakan upplýsingar um øll í familjuni hjá viðkomandi.

Tað merkir:

- foreldur,
- børn,
- heil- og hálvsystkin,
- mammubeiggjar og -systrar,
- pápabeiggjar og -systrar,
- børn hjá systkjum, ▸

*Mynd 5*




*Mynd 6*

| Tíðarskeið | Eins-kyn tvíburapar | Tvey-kyn tvíburapar | Íalt |
|---|---|---|---|
| 1700-1869 | 158 | 84 | 242 |
| 1870-1930 | 310 | 145 | 455 |
| 1931-1952 | 128 | 70 | 198 |
| 1953-1982 | 222 | 109 | 331 |
| 1983-2000 | 149 | 55 | 204 |
| 2001-2009 | 77 | 39 | 116 |
| 2010-2022 | leypandi uppdatering | | |




***Mynd 7.*** *Skyldskapur*

- ommur og abbar,
- ommubørn og abbabørn,
- systkinabørn,
- trímenningar,
- ferminingar o.s.fr.

Ættarbandsskráin tekur støði í tí einfalda trio skyldskapinum, mamma, pápi og barn, sum er samlað til eitt ættartræ. Haraftrat er eisini skrásett í Ættarbandsskránni, um persónurin td. hevur somu ommu, men ikki sama abba, sum eitt systkinabarn. *Sí mynd 7.*

## Ættarbandsskráin stóran týdning í ílegugransking

Ílegugranskingarverkætlanir, har leitað verður eftir møguligum sjúkumynstrum og arvagongd í ávísum familjum, verður rópt familjugransking. Týdningurin av Ættarbandsskránni er stórur í slíkari familjugransking.

Innan ílegugransking verður eisini arbeitt við sonevndari samanberandi gransking (case/control), har samanbering verður gjørd millum ílegurnar hjá

***Mynd 8.***

| Tal av konum, sum áttu børn í 1880-unum | Tal á børnum født í 1880-unum | *Miðal uppá eftirkomarar frá teimum konunum, sum áttu í 1880-unum* |
|---|---|---|
| 1797 | 4600 | 241 |

einum sjúkubólki, tað eru kanningar, har fólk við eini sjúku verða kannað og samanborin við fólk, sum ikki hava ta sjúkuna, sum verður kannað.

Eisini her er Ættarbandsskráin eitt sera hent amboð fyri føroyska gransking, tí vit eru so nær skyld.

Ættarbandsskráin ger, at til ber at gera útrokningar, sum kunnu leggja upp fyri ov tøttum skyldskapi í luttakarabólkinum í eini tílíkari verkætlan. Ættarbandsskráin er eisini hent, tí vit kunna brúka hana til at fáa vissu fyri, at fólkini, sum eru kontrollar, ikki eru nær skyld við tey fólkini, sum hava sjúkuna, *sí mynd 8 og 9*

Tað kann geva misvísandi úrslit í kanningunum, um skyldskapurin er ov tættur. Mynd 8 vísir tal av konum, sum áttu børn í 1880-unum. Mynd 9 vísir tal av fólki skrásett í Ættarbandsskránni. Mynd 10 vísir tal av eftirkomarum hjá konum í Føroyum, sum áttu børn í 1880-unum. Mynd 11 vísir consanguinity (te. skyldskap) millum luttakarar í eini verkætlan.

## Arvagongd

Sjúkur, sum eru tengdar at ílegubroytingum, hava ymsa arvagongd. Arvagongdirnar fyri recessivar (víkjandi) og dominantar (ráðandi) ílegubroyting eru ymiskar:

Er talan um recessiva ílegubroyting, verður tú bert sjúk/ur, um tú arvar ílegubroytingina frá báðum foreldrunum. Arvar tú broytingina frá øðrum teirra, ert tú frískur berari av sjúkuni.

Er talan um dominant ílegubroyting, verður tú sjúk/ur, um tú arvar ílegubroytingina frá øðrum av foreldrunum.

Aðrar ílegusjúkur arvast bert gjøgnum mammuna.

Alt eftir, hvat slag av sjúku, talan er um, arvast ílegubroytingar sambært eini av hesum arvagongdunum. Her er tað, at Ættarbandsskráin er eitt veruliga hent amboð hjá læknum og granskarum.[4]

## Ættartalva og ættartræ

Er illgruni um, at ein persónur ber eina arvaliga sjúku, verður eitt ættartræ vanliga teknað fyri viðkomandi fyri at kanna, um ávís sjúkumynstur síggjast í ættini hjá persóninum. Upplýsingar úr Ættarbandsskránni kunnu samankoyrast við upplýsingar um sjúku í ættini (bert um loyvi fæst til tað) og síðani verður vitanina um arvagongdina hjá sjúkuni kannað til tess at gera neyvari greiningar við støði í ættartrænum hjá tí einstaka.

Fyrst verður vanliga hugt at næstringunum hjá

| Ár | Tal av fólki skrásett |
|---|---|
| 1880 og nýggjari | 104.787 |
| 1800-1899 | 34.455 |
| 1700-1799 | 13.413 |
| 1600-1699 | 6.364 |
| 1500-1599 | 1.018 |
| 1400-1499 | 51 |
| 1300-1399 | 54 |
| 1200-1299 | 21 |
| 1100-1199 | 4 |
| | |
| Íalt | 158.404 |
| Tal uttan skrásetta føðidato 8.523 | |

***Mynd 9.*** *Tal av fólki skrásett í Ættarbandsskránni*

| Konur | Eftirkomarar |
|---|---|
| 1220 | Upp til 500, í miðal 149 |
| 229 | Upp til 1500, í miðal 737 |
| 6 | Upp til 2000, í miðal 1683 |
| 1 | 3474 |
| 341 | 0 |

***Mynd 10.*** *Tal av eftirkomarum hjá konum sum áttu børn í 1880-unum*

persóninum, men við Ættarbandsskránni ber til at leita langt aftur og langt út í ættini. Fleiri sjúkur eru í Føroyum, sum gjøgnum greiningar vísa seg at hava eina beinleiðis slóð aftur til ávísan navngivnan persón, sum er í Ættarbandsskránni. Á henda hátt kann nýggj vitan um ávísa sjúku finnast, og møguleikarnir fyri sjúkufyribyrging og sjúkuviðgerð gerast betri.[4]

## Felags niðurstøðurnar

Um vit nú venda aftur til byrjanina í greinini, um hvat eygnasjúkur, multippel sklerosa og parkinson hava tað til felags, so eru hesar niðurstøður gjørdar um hesar sjúkur við støði í vísindaligum kanningum, grundaðar á Ættarbandsskránna:

- Fyri tær fýra eygnasjúkurnar, sum vóru kannaðar, er galdandi, at tær hava eina recessiva arvagongd. Har varð funnið fram til fólk, sum høvdu sjúkuna, fólk sum vóru berarar, og fólk sum hvørki vóru berarar ella sjúk.[5,6]
- Fyri multippel sklerosu, har Ættarbandsskráin var brúkt, er ikki grundarlag fyri at siga, at sannlíkindi at fáa sjúkuna eru størri, um tú ert í ætt við ein, sum hevur sjúkuna.[7]
- Fyri parkinson, har Ættarbandsskráin eisini var brúkt, eru sannlíkindini størri hjá summum (ikki øllum) at fáa sjúkuna, um onkur í familjuni hevur sjúkuna.[8]

Ættarbandsskráin hevur verið brúkt til yvir 40 verkætlanir og hevur víst seg at vera eitt hent amboð til ílegugransking. Vit halda sjálvi, at vit hava eina Ættarbandsskrá í heimsflokki, og tað er Tjóðskjalasavninum fyri at takka.



***Mynd 11.*** *Consanguinity millum luttakarar og controllar í eina verkætlan*

(1) Jorgensen, T.H., Buttenschön, H.N., Wang, A.G. et al. The origin of the isolated population of the Faroe Islands investigated using Y chromosomal markers. Hum Genet 115, 19–28 (2004). https://doi.org/10.1007/s00439-004-1117-7
(2) Leinkja til donsku heimasíðuna við deyðsattestir fyri føroyingar deyðir 1879-1944 https://www.sa.dk/ao-soegesider/da/other/index-creator/181/340941/20167632
(3) Persónlagað medisin í Føroyum Ætlan fyri 2019 til 2024 © Heilsu- og innlendismálaráðið 2019
(4) Brot úr grein "Ættarbandsskráin og ílegugransking" sum Katrin D. Apol, kunningarsamskipari hjá Fargen, hevur skriva, greinin er ikki almanna kunngjørd enn.
(5) Br J Ophthalmol . 2009 Mar;93(3):409-13. doi: 10.1136/bjo.2007.131110. A novel founder BBS1 mutation explains a unique high prevalence of Bardet-Biedl syndrome in the Faroe Islands. T Duelund Hjortshøj 1, K Grønskov, K Brøndum-Nielsen, T Rosenberg. PMID: 18669544 DOI: 10.1136/bjo.2007.131110
(6) Ostergaard E, Duno M, Batbayli M, Vilhelmsen K, Rosenberg T. A novel MERTK deletion is a common founder mutation in the Faroe Islands and is responsible for a high proportion of retinitis pigmentosa cases. Mol Vis. 2011;17:1485-92. Epub 2011 Jun 4. PMID: 21677792; PMCID: PMC3110495.
(7) Binzer S, Imrell K, Binzer M, Kyvik KO, Hillert J, Stenager E. High inbreeding in the Faroe Islands does not appear to constitute a risk factor for multiple sclerosis. Mult Scler. 2014 Nov 12. pii: 1352458514557305
(8) Maria Skaalum Petersen, Sara Bech, Ekaterina Nosova, Jan Aasly, Matthew J Farrer. Familial aggregation of Parkinson's disease in the Faroe Islands. PMID: 25600277 DOI: 10.1002/mds.26132



*Gutti Niklasen úr Fuglafirði hevði stolið eina ær um náttina í Líðini og bar hana livandi heim til hús og drap hana har. Um morgunin varð hann avdúkaður, tí teir eltu slóðina eftir hann.*



# Eitt SKATTKAMAR UM OKKARA FORFEDRAR

Í sambandi við skrivingina av bókini um navnframu Beintu komu vit nógv inn á gólvið í lesistovuni hjá Tjóðskjalasavninum í Havn. Nógv var at læra um, hvussu vit best kundu leggja arbeiðið til rættis, og her greiða vit frá nøkrum av okkara royndum við hesum arbeiðinum.




**Magni Laksáfoss**
ph.d.polit.
magni@laksafoss.com



**Lydia Laksáfoss**
Grafikari
lydialaksafoss@yahoo.dk


**Í einum kjallara** undir Heilsufrøðiligu Starvsstovuni liggur eitt satt skattkamar av søgum um okkara forfedrar. Har liggur nevniliga goymslan og lesistovan hjá Tjóðskjalasavninum við øllum teimum ævintýrligu bókunum við gotisku hondskriftini heilt aftur frá 1600-talinum.

At lesa úr teimum bókunum er sum at fara inn í ein farnan, gloymdan heim, og eftir stuttari tíð byrjar tú at kenna nøvnini á ávísum persónum í føroysku søguni aftur, og tað kennist, sum um fólkini gerast livandi aftur.

Meiri og meiri tú lesur, tess meiri byrjar ▸




*Fyrra bókin um Beintu, sum er skrivað út frá upprunaskjølum úr skjalasavninum. Hon er 168 síður og fevnir um fyrru hálvu av hennara lívi.*

Tekningar:
**Erling Laksáfoss**

tú at skilja, hvørjari verð tey livdu í, og hvussu teirra dagligdagur sá út. Tað er sum at síggja ein annan heim í eini glaskúlu, har tú fært brotstykkir úr eini farnari tíð, men tú skalt hyggja rættiliga leingi fyri at fáa eina fatan av heildini.

### Hugtakandi lesnaður við gotiskari hondskrift

Fyri flestu okkara tykjast bøkurnar at vera ógjørligar at fara í holt við, tí tær eru skrivaðar við gotiskari hondskrift. Tann gotiska hondskriftin er tó ikki verri enn so, at hon nokk fyri flestu okkara er sum fagurskriftin er fyri ungdómin í dag. Hana læra tey ikki longur, tí alt er skrivað á telduni, men tá ið tey fyrst hava lært, hvussu einstøku bókstavirnir síggja út, er ikki so torført at lesa, hvat stendur har.

Eins og við fagurskriftini er einans talan um, at útsjóndin av bókstavunum er øðrvísi, enn vit eru von við. Nógvir gotiskir bókstavir líkjast nógv fagurskriftini, meðan aðrir eru heilt øðrvísi. Tað er ikki so torført at læra, tí fleiri bøkur eru, sum kunnu hjálpa við at týða gotisku bókstavirnar, og teir eru eisini at finna á alnótini.

Okkara royndir eru, at tað tekur umleið eina viku at læra at lesa gotisku hondskriftina nóg væl til at skilja flestu tekstirnar, sum eru skrivaðir við penari hondskrift. Tá eru tað tó framvegis nøkur orð, ið man misskilir, og onnur orð, ið ikki eru til at lesa. Hóast ein vika kann tykjast sum long tíð, skal man minnast til, at longu eftir einum ella tveimum døgum byrjar man at fáa eina fatan av, hvat fer fram í tekstinum, og longu tá byrjar tú at fáa eitt innlit í ein farnan og hugtakandi heim.

Síðan tekur tað nakrar mánaðir at læra hondskriftina nóg væl til at skilja øll orðini og eisini tað, sum er skrivað við minni penari hondskrift.



*Ein av ævintýrligu bókunum úr Tjóðskjalasavninum við gotiskari hondskrift við søgum um lívið hjá forfedrum okkara. Til bókina um Beintu eru fleiri enn 15.000 slíkar síður gjøgnumgingnar.*

### Gamalt danskt og gamalt føroyskt

Næsta stuttliga avbjóðingin eru sjálvi orðini. Stórur partur av tekstinum er ikki ringur at skilja, men rættiliga ofta kemur tú fram á orð, sum ikki eru kend fyri okkum, og onnur orð, har týdningurin var ein annar tá á døgum, enn hann er í dag.

Eitt dømi um ein tekst á donskum kann vera:

> *„Han mente sig ikke færdig at skrive men lod i retten frembringe et instrument og påæskede en billig løsning."*

Um vit skuldu skrivað hetta á nútíðar donskum, kundi tað staðið nakað soleiðis:

> *„Han mente sig ikke at have færdigheder til at kunne skrive, men lod i retten fremlægge et dokument og bad om en retfærdig afgørelse."*

Sum sæst, kenna vit flestu orðini aftur í upprunatekstinum, men hava kortini ilt við at skilja, hvat teksturin sigur okkum. Har eru tó fleiri heimasíður á alnótini, sum hava orðabøkur fyri eldri danskt mál, so tað er í flestu førum ikki so torført at finna týdningin av orðunum.

Tað allarmesta er skrivað á gomlum donskum, men tað kemur eisini fyri, at okkurt er skrivað á føroyskum. Eitt dømi um hetta er eitt bræv, sum Beinta gav vártinginum, meðan hon búði í Kálvalíð, har hendingarnar eru skrivaðar á donskum, meðan orðadrátturin er endurgivin á føroyskum:

> *„da Svarede Sunneva Andersdatter bar Ee pridlur saa blandede jeg ike vatn i det som ettur var, da Svarede Sunneva Olesdatter, Tha Ee kom til Nøytene, da kom du fraie theim Da stoed they tur, da sad Jeg og graed offver bien"*

Í dag høvdu vit skrivað:

Da svarede Sunneva Andersdatter: *„Bar eg prillur, so blandaði eg ikki vatn í tað, sum eftir var."* [prillur = ein seyðaskinnsekkur, sum bleiv brúktur at bera ella goyma vørur í, m.a. mjólk. ] Da svarede Sunneva Olesdatter: *„Tá eg kom til neytini, tá kom tú frá teim. Tá stóðu tey turr. Tá sat eg og græt yvir biðið."* [stóðu turr = eingin mjólk eftir, tí onkur longu hevði mjólkað teimum, biðið = træílæt at bera mjólk heim við.]

Okkum kunnugt er hetta brævið hjá Beintu tað elsta, har føroyskt er skrivað í longri brotum. Vit hava eisini funnið aðrar einkultar styttri setningar, men her er talan um, at allur orðadrátturin er á føroyskum. Alt brævið hjá Beintu er annars at finna í seinnu bókini um Beintu.

### Sjóræningar, seyðatjóvar og leysingabørn

Flestu elstu bøkurnar á Tjóðskjalasavninum eru um rættarmál og um stórhendingar tá í tíðini. Um tú ætlar tær at lesa um tína ætt, mást tú fyrireika teg uppá, at tú nokk ert í ætt við okkurt leysingabarn, onkran seyðatjóv, onkran prest ella tað, ið verri er. Í minsta lagið má tín forfaðir hava verið partur av onkrum máli antin sum tann, sum gjørdi órætt móti øðrum, ella sum tann, sum onkur gjørdi órætt ímóti.

Um forfedrarnir hjá tær skikkaðu sær pent, er einki rættarmál at finna, og tá er torført at finna nakað tilfar um fólkini, tí tað mesta av tí skrivliga tilfarinum er um ósemjur millum fólk.

Har eru bestu keldurnar vártingsbøkurnar og løgtingsbøkurnar.

Um onkur ósemja var, varð málið tikið upp á vártingi. Um málið varð kært víðari frá vártinginum, kom tað í løgtingið, sum var hægri dómstólur. Vártingið var sostatt fyrsta liðið í flestu ósemjunum og harvið besta keldan til at finna tilfar um fólk. Tað var eisini á vártingi, at fólk tinglýstu keyp og sølu av ognum, og sostatt eru hesi viðurskiftini eisini at finna í hesum bókunum.

Seinni komu tinglýsingarnar í sjálvstøðuga bók, kallað *panteprotokollen*, har keyp og søla av ognum og lántøka varð væl skrásett.

Umframt omanfyri nevndu keldur eru ymiskar skiftiprotokollir, sum greiða okkum frá, tá onkur doyði. Her fæst ofta nógv annað at vita, tí í sambandi við skifti greiddu fólk ofta frá nógvum ymiskum, sum gevur innlit í teirra lív, t.d. nevnir beiggi Beintu í skiftinum eftir mammuna, at hann las í Danmark, tá ið hann var yngri, og at foreldrini høvdu goldið fyri hansara útbúgving. Eisini sjálvur arvurin er áhugaverdur, tí úr honum sæst, hvørjar ognir fólk hava átt, t.d. jørð, hús, møblar, innbúgv, klæði, steintoy, kríatúr o.a., heilt niður í hvørja einkulta skeið ella grýtu.



*Smádrongur úr Sumba, tikin fyri stuldur, pískaður, brendur við tjóvamerki í pannuna og sendur á Bremarhólm fyri lívstíð.*

### Journalin hjá fútanum og teir halgaðu prestarnir

Fútin var hægsti embætismaður tá á døgum, og hann hevði skyldu til at hava eina kopibók, har hann skrivaði avrit av øllum innkomnum brøvum og av brøvum, sum hann sendi til onnur fólk. Fútabøkurnar eru harvið ein góð kelda til almenn viðurskifti tá í tíðini, men minni góð til at finna søgur um vanlig fólk.

Harafturímóti kann *gejstlighedens mødeprotokol* stundum vera stuttlig at lesa, tí har standa sakir, ið viðkoma prestunum. Prestarnir vóru nevniliga so halgaðir, at teir ikki vóru partur av vanligu rættarskipanini, men høvdu egna rættarskipan, har teir skuldu døma ▸

hvønn annan. Ofta førdi hetta tó til, at teir vildu ikki døma hvønn annan, og tí endaðu fleiri sakir í ongum. Hetta merkti tó ikki, at teir ongan dømdu, tí tænastufólk hjá prestunum vóru eisini dømd í próstarættinum, og teir fýrdu ikki fyri at fella dóm yvir tey. Prestarnir høvdu eisini egna skiftiprotokol.

### Hjálpsemi og vegleiðing á Tjóðskjalasavninum

Á hugnaligu lesistovuni á Tjóðskjalasavninum fæst góð vegleiðing í at finna tað tilfar, ið man skal brúka til sína gransking. Starvsfólkini eru vinarlig og hjálpsom í allar mátar.

Tað tekur tó tíð at lesa gotisku hondskriftina, og tí valdu vit at taka myndir av síðunum í bókunum og heldur lesa tær heima á telduni. Hetta ber væl til, tí einhvør fartelefon hevur gott myndatól í sær, og har ber til at taka nógvar myndir í góðari góðsku, og so ber til at sita heima um kvøldarnar í friði og náðum og lesa gomlu bøkurnar. Tá hevur man samstundis hjálpina frá alnótini til at týða gotisku hondskriftina og finna gomlu donsku orðini.

Nakað av tilfarinum er eisini longu lagt talgilt út á alnótina á history.fo. M.a. eru skiftiprotokollir har.

### Ættargranskarar og Rigsarkivet

Føroyar vóru tá á døgum partur av vanligu donsku fyrisitingini. Hetta merkir, at øll tann føroyska rættar-skipanin og fyrisitingin var meinlík tí donsku tá í tíðini og tí kann vera rættiliga hent at vera limur í donskum ættargranskarafelagsskapi, tí tann vegin fæst nógv vitan um, hvar upplýsingar kunnu finnast. T.d. hava lima-bløðini ofta greinir um ymisku keldurnar, har greitt verður frá, hvussu tú sum ættargranskari kanst finna og brúka tilfarið. Á Rigsarkivet er eisini nógv at finna um føroyingar, og har liggur tað mesta talgilt á alnótini og er enntá lagt í ein sjálvstøðugan bólk fyri Føroyar, so tað er sera lætt at finna.

### Ein spennandi ferð inn í annan heim

Fyri okkum varð arbeiðið við bókini Beintu ein spennandi ferð inn í ein annan farnan heim. Gomlu Føroyar og gomlu føroyingarnir gjørdust livandi aftur fyri okkum. Vit sóu, hvussu tey livdu og stríddust, og hvussu ójavnt ríkidømið var býtt. Vit byrjaðu at skilja, hví menn gjørdust seyðatjóvar, og hvussu levnaðurin var á Skansanum í Havn.

Skjølini á Landsskjalasavninum søgdu frá higartil ókendum hendingum í lívinum hjá Beintu og søgdu



samstundis søguna um suðuroyingarnar og sandoyingarnar, ið høvdu eitt gott gildi, eftir at teir funnu víntunnur á sjónum, um havnarfólk, sum rýmdu undan sjórænarum, um tjóvar, sum vórðu brennimerktir, um Guttorm í Múla, ið hjálpti Beintu, um sváru støðuna hjá Lucas Debes av dóttrini og ikki minst um, tá ið pokurnar gjørdu av við nærum allar havnarmenn og um ringastu ólavsøkuna í Føroya søgu í 1709, tá ið hvørki øl, tubakk ella brennivín var at fáa.

Meðan vit lósu um hendingarnar í skjølunum, gjørdust forfedrarnir livandi fyri okkum, og vit upplivdu tey, soleiðis sum tey upplivdu lívið, meðan tey livdu. Tí kendist tað sum at møta gomlum vinum og skyldfólkum, hóast vit frammanundan neyvan vistu av, at tey høvdu verið til.

### Fólkini gerast livandi gjøgnum tekningar

Gomlu bøkurnar við gotisku hondskriftunum eru ikki lætt atkomuligar fyri vanlig fólk, og tá ið bókin um Beintu skuldi skrivast, var tað eitt stórt ynski hjá okkum, at hon skuldi vera fólkslig og løtt at lesa, men samstundis akademiskt væl funderað. Tí er strembað eftir at hava ein lættan flótandi tekst, samstundis sum tað á hvørjari einkultari síðu verður víst til keldurnar, soleiðis at ein og hvør hevur møguleika fyri at fara djúpari inn í upprunatilfarið, um tey ynskja tað.

Meðan vit arbeiddu við bókini um Beintu, komu vit ofta til at kjakast um, hvussu fólkini sóu út, um tey vóru hávaksin ella lágvaksin, tjúkk ella kløn. Eisini prátaðu vit um, hvussu tey vóru sum persónar, illsint ella siðilig. Vit byrjaðu at síggja fólkini fyri okkum og ímyndaðu okkum støðurnar, sum tey vóru í.

Tað eru hesar hugleiðingar um fólkini og støðurnar, vit við tekningum vildu gera livandi, soleiðis at onnur eisini kundu fáa eina mynd av, hvussu vit hildu, at gomlu Føroyar sóu út. Hesin hátturin við løttum teksti, keldum og tekningum ger tilfarið á Tjóðskjalasavninum atkomuligt fyri øll. Bæði tey fakkønu og leikfólkið, sum hugna sær við løttum lesnaði um kvøldarnar.

*Inni í einahandilin á Tinganesi í Havn. Har var nógv ymiskt at fáa til keyps, serliga týdningarmikið var kornið, timbur til bátarnar og bjargalínur. Í handlinum var eisini øll framleiðslan seld, m.a. hosur, ull, fjaðrar og turrur fiskur.*

# SKJALASAVNSDAGUR

Á hvørjum ári, annan leygardag í november, skipar Tjóðskjalasavnið fyri Skjalasavnsdegi.

**Dagurin er partur** av tiltaki, sum verður hildið samstundis í øllum norðurlondum. Tiltakið stavar upprunaliga úr Svøríki, har fyrsti 'Arkivernes Dag' varð hildin í 1998. Sum frá leið fóru onnur norðurlond eisini at skipa fyri Skjalasavnsdegi, og í 2003 varð tiltakið hildið í Føroyum fyrstu ferð.

Endamálið við degnum er m.a. at kunna almenningin um arbeiðið hjá skjalasøvnunum, og vísa hvørja nyttu einstaklingar og samfelag kunnu fáa úr skjølum og skjalasøvnum. Tey flestu árini hevur Tjóðskjalasavnið skipað fyri fyrilestri, havt lítla skjalaframsýning og víst runt á goymslum. Tiltøkini hava verið væl vitjað.





